B Ú S K A P A R R Á Ð I Ð

# BÚSKAPARFRÁGREIÐING

HEYSTIÐ 2011

1. SEPTEMBER 2011

# INNIHALDSYVIRLIT


BÚSKAPARRÁÐIÐ .... 4

1. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI .... 6

2. MØGULEIKAR AT BROYTA FISKIVINNUSKIPANINA .... 9

2.1 Inngangur .... 9

2.1.1 Burðardyggleiki og stovnsrøktin eru grundarlagið .... 9

2.1.2 Væleydnað fiskivinnuumsiting á fleiri økjum .... 10

2.2 Broytingar í loyvisskipanini .... 12

2.2.1 Stutt um ognarrættin til livandi tilfeingið í havinum .... 13

2.2.2 Fiskirættindi kunnu lutast út á almennum uppboði .... 14

2.2.3 Hvussu ein uppboðssøla av rættindum kann skipast .... 16

2.3 Onnur fyribrigdi at taka støðu til .... 17

2.3.1 Áseting av TAC og mest loyvda dagatali .... 18

2.3.2 Tilráðingin frá *Skipanarnevndini* um stilling av døgum .... 18

2.3.3 Hugtakið *felags kvota við hámarki* .... 20

2.4 Niðurstøður .... 21

3. KONJUNKTURMETING .... 22

3.1 Heildarmeting .... 22

3.2 Búskaparlig útlit .... 24

3.2.1 Seinasta konjunkturgongdin .... 24

3.2.2 Framrokning av BTÚ .... 25

3.2.3 Altjóða búskaparútlit .... 27

3.3 Geirarnir í búskapinum .... 29

3.3.1 Tað almenna .... 29

3.3.2 Húsarhaldini .... 30

3.3.3 Tilfeingisvinnurnar .... 31

3.3.4 Fíggjargeirin .... 33

3.3.5 Aðrar vinnur .... 34

3.3.6 Útlond .... 36

ORÐALISTI .... 37

BÓKMENTIR .... 40

# BÚSKAPARRÁÐIÐ

Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð skal koma út tvær ferðir um árið.

Valskeiðið hjá hesum Búskaparráðnum er trý ár og seks mánaðir frá 1. juli í 2009 at rokna. Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Tað er ásett í lógini fyri Búskaparráðið, at tað skal gera tvær konjunkturfrágreiðingar árliga, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september.

Frágreiðingin hesa ferð er framhald av várfrágreiðingini 2011. Frágreiðingin lýsir nakrar høvuðsættir í fiskivinnuumsitingini, sum Búskaparráðið heldur vera avgerandi at broyta, skal lønsemið fiskivinnuni batna, og skal fiskivinnan kasta enn meira av sær til samfelagið. Harafturat fevnir frágreiðingin um eina dagførda meting av konjunkturstøðuni.

Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við avtalu løgd til Landsbanka Føroya at taka sær av.

Limir ráðsins eru:

Thomas Dam, *cand.merc, formaður*

Durita Tausen, *cand.scient.oecon*

Gunn Danielsen, *cand.polit*

Búskaparráðið
Tíðindaskriv 1. september 2011

# Lønsemi í fiskivinnuna og meira til samfelagið

## Tað ber til at fáa lønsemi í fiskivinnuna, og samfelagið kann fáa munandi meira burtur úr tilfeinginum. Hetta krevur broytingar. Øll veiðirættindi eiga at verða seld á uppboði. Lyklaorðini eru stovnsrøkt og marknaðargerð, skal fiskivinnan gerast burðardyggari

Búskaparráðið hevur almannakunngjørt heystfrágreiðing sína. Fokus er á lønsemi í fiskivinnuni, og hvussu samfelagið kann fáa meira burtur úr felags føroyska tilfeinginum.

- Er politiskur vilji, ber til. Stovnsrøkt og burðardygd eru týðandi, og broytingar í fiskidaga- og -loyvisskipanini skulu til, sigur Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum.

Frágreiðingin inniheldur tilmæli um, hvussu lønsemi fæst í fiskivinnuna, so hon kastar meira av sær til samfelagið. Høvuðstilmælini eru, at øll skipanin verður meira marknaðarlig, og at stovnsrøktin fer fram eftir greiðum umsitingarætlanum.

- Tað er positivt, at politikarar hava ásett, at fiskiskapurin skal vera burðardyggur í 2015. Tað er tó ein veikleiki, at ongin umsitingarætlan enn er gjørd, og at tað á hvørjum ári er Løgtingið sum ásetur samlaða fiskidagatalið, sigur formaðurin.

Royndirnar at selja veiðirættindi til makrel á uppboði fyrr í ár vísa, at stór virði eru knýtt at rættindunum at fiska makrel, og at til ber at selja slík rættindi á einum skipaðum marknaði.

- Fyri 20 tús. tons var inntøkan 72 mió. kr. (selt fyri 3,60 kr. pr. kg. í miðal)
- Fyri 63 tús. tons var inntøkan 16 mió. kr. (tilfeingisgjald á 0,25 kr. pr. kg.)
- Fyri 35 tús. tons var eingin inntøka (útlutað uttan nakað gjald)

- Verandi skipan forðar fyri kapping og gjøgnumskygni, og búskaparliga sæð, er rættast at øll fiskirættindi verða seld umvegis ein skipaðan marknað. Vit mæla til, at royndarskipanin fram til 2018 verður útbygd til eisini at fevna um marknaðin fyri víðarisølu av fiskirættindum og nýggj veiðirættindi, sum kunnu taka seg upp, sigur Thomas Dam, formaður í Búskaparráðnum.

Í frágreiðingini er eitt uppskot um, hvussu ein marknaðarlig skipan kann verða sett í verk. Lagt verður upp til eina skiftistíð á t.d. 5 ár har ein vaksandi partur av øllum veiðirættindum verður seldur á einum skipaðum marknaði. Á henda hátt verða øll veiðirættindi seld á einum skipaðum marknaði í 2023.

Umráðandi er at ein nýggj skipan verður fyrireikað í góðari tíð, so vinnan so tíðliga sum gjørligt veit, hvørjir karmar vera at virka innan eftir 2018.

**Thomas Dam, formaður, hevur tel. 761003. Tak frágreiðingina niður á www.buskap.fo.**

# 1. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI

Vánaligt lønsemi í heimaflota Nøgdirnar av botnfiski, sum verða fiskaðar í føroyskum sjógvi, eru minkaðar nógv síðstu árini, og hetta er fremsta orsøkin til vánaliga lønsemið í heimaflotanum. Nevnast kann, at síðstu umleið 5-6 árini hava avreiðingarnar av toski verið umleið helmingurin av teimum nøgdum, sum eru langtíðarmiðal av avreiðingum av toski fiskaður á Landgrunninum.

Skal lønsemið í fiskivinnuni batna, verður neyðugt framhaldandi at menna stovnsrøktina. Fyrimunirnir við at troyta fiskastovnar burðardygt eru eyðsýndir. Størstu nøgdirnar fáast úr fiskastovnum yvir tíð, tá ið fiskiskapur og roynd eru burðardygg. Harafturat fæst hægri prísur, um fiskiskapurin er góðkendur sum burðardyggur, umframt at váðin verður minni fyri allar luttakarar í fiskivinnuni.

...men fleiri tættir í fiskivinnuumsitingini væleydnaðir Fleiri aðrir tættir í føroyskari fiskivinnuumsiting eru kortini væleydnaðir. Gransking í fiskasløgum o.tíl. er á høgum stigi. Hagtøl og skrásetingar eru á høgum stigi, og eftirlitsskipanir eru sum heild góðar, umframt at myndugleikar fáa lívfrøðilig tilmæli á høgum stigi umvegis samstarvið millum Havstovu og ICES, og tilráðingin er eisini alment atkomilig.

Kortini hevur lønsemið í heimligu fiskivinnuni verið vánaligt í fleiri ár, og síðani fiskidagaskipanin varð sett í verk, hevur royndin eftir teimum týðandi botnfiskasløgum undir Føroyum verið størri enn tilætlað. Havandi í huga, at fleiri týðandi tættir í føroyskari fiskivinnuumsiting eru væleydnaðir, eru allar orsøkir at halda, at til ber at bøta um lønsemið í føroyskari fiskivinnu, og at fiskivinnan harvið kann kasta meira av sær til samfelagið.

Veikleikar við fiskidagaskipan Hóast fleiri góðir eginleikar eru við eini fiskidagaskipan, eru eisini vansar við eini tílíkari skipan. Skal royndin ikki vaksa yvir tíð, er neyðugt at minka talið av fiskidøgum og veiðiloyvum í skipanini, so hvørt sum tøknilig menning fer fram. Tá ið talið av fiskidøgum minkar samstundis sum talið av fiskiførum við veiðiloyvi mestsum er óbroytt í fleiri veiðibólkum, er eyðsæð at færri fiskidagar vera til hvørt skipið, og lønsemið versnar hjá øllum. Avbjóðingin er lutvíst, at tað er tørvur á færri og færri skipum orsakað av tøkniligari menning, og lutvíst at tað samfelagsbúskaparliga er alneyðugt, at tað eru tey effektivastu skipini, sum vera verandi í vinnuni. Í verandi fiskidagaskipan ber ikki til at stýra eftir hesum.

Ein annar veikleiki er, at umsitingarætlanir (management plan, recovery plan o.tíl.) vera torførar at umsita, við tað at eingin beinleiðis áseting er av mest loyvdu veiði (TAC) fyri hvørt fiskaslag. Royndirnar síðani fiskidagaskipanin varð sett í verk vísa, at hon hevur verið torfør at umsita og stilla lívfrøðiliga rætt, og helst var eisini ov nógv veiðiorka í skipanini frá byrjan av sammett við eina burðardygga roynd.

Ikki vanligt aðrastaðni, at *løgting* ásetur TAC, mest loyvdu roynd o.tíl. Tað er ikki vanligt í okkara grannalondum ella aðrastaðni, at *tingið* ásetur mest loyvdu veiði ella tal av fiskidøgum. Aðrastaðni áseta fiskimálaráðini TAC, mest loyvdu roynd o.tíl. Royndirnar úr verandi skipan, har ið Løgtingið ásetur fiskidagarnar í fiskidagaskipanini, vísa týðuliga, at politiska skipanin ikki í nóg stóran mun er før fyri at taka langtíðaratlit. Freistingin hjá

politisku skipanini at taka stutttíðaratlit er stór, m.a. tí at løgtingsval eru við jøvnum millumbilum.

Eisini kann nevnast, at umsitingarætlanir o.tíl. eru ikki settar í verk fyri tey týðandi botnfiskasløgini í føroyskum sjógvi. Tað hevði óivað gagnað umsitingini av føroyskari fiskivinnu, vórða tílíkar ætlanir settar í verk. Búskaparráðið mælir til at arbeiðið, sum er byrjað, við at menna umsitingarætlanir fyri tey týðandi fiskasløgini í føroyskum sjógvi, heldur fram.

Loyvisskipanin kann tillagast í eini skiftistíð Fleiri veikleikar eru við verandi loyvisskipan. Loyvisskipanin er kappingaravlagandi, og útlitini fyri varandi undirtøku fyri henni eru ivasom. Fiskivinnan eigur at hava støðugar karmar at virka innanfyri. Skal hon hava tað, verður neyðugt at broyta loyvisskipanina.

Møguleikar eru í lóg um vinnuligan fiskiskap at broyta loyvisskipanina eftir 1. januar 2018. Loyvisskipanin kann t.d. verða broytt í stigum og í eini skiftistíð á t.d. 5 ár til eina meira marknaðarliga skipan.

Royndirnar at selja veiðirættindi til makrel á uppboði fyrr í ár vísa, at stór virði eru knýtt at rættindunum at fiska makrel, og at til ber at selja slík rættindi á einum skipaðum marknaði.

- Fyri 20 tús. tons var inntøkan 72 mió. kr. (selt fyri 3,60 kr. pr. kg. í miðal)
- Fyri 63 tús. tons var inntøkan 16 mió. kr. (tilfeingisgjald á 0,25 kr. pr. kg.)
- Fyri 35 tús. tons var eingin inntøka (útlutað uttan nakað gjald)

Mælt verður til, at vit fram til 2018 útbyggja royndarskipanina til eisini at fevna um marknaðin fyri víðarisølu av fiskirættindum og nýggj veiðirættindi, sum kunnu taka seg upp.

Metingar av búskaparvøkstri lækkaðar Útlit eru til, at BTÚ í 2011 og 2012 í miðal kann vaksa 3% um árið í ársins prísum. Í februar varð mett, at vøksturin kundi vera 5% í miðal um árið í 2011 og 2012; metingin er sostatt lækkað 2%-stig pr. ár. Størsta orsøkin er lægri væntanir til vøkstur í privatari nýtslu og privatum íløgum grundað á gongdina í lyklatølum higartil í ár. Harafturat hava avreiddu nøgdirnar av botnfiski higartil í ár verið minni, enn metingar áður vóru grundaðar á, umframt at væntanir til búskaparvøkstur næstu 1-2 árini eru lækkaðar í flestu framkomnum londum.

Hendingar fjórða ársfjórðing 2010 ávirkaðu búskapin Síðstu mánaðirnir av 2010 vóru ávirkaðir av trupulleikum í Eik Banka og Faroe Seafood, og hesar hendingar hava uttan iva havt negativa stutttíðar ávirkan á væntanir hjá húsarhaldum og fyritøkum. Húsarhaldsnýtslan var á einum sera lágum stigi í 2010 aftaná búskaparligu niðurgongdina í 2008 og 2009. Mett verður, at húsarhaldsnýtslan dróg niður í vøkstrinum í 2010. Sambært mvg-hagtølum eru ábendingar um, at nýtslan hevur hildið sær á hesum lága stigi fyrra hálvár 2011. Seinasta treystikanningin bendir á, at húsarhaldini hava heldur frægari vónir um útlitini, og tí er hugsandi, at tey fara at vaksa partin av inntøkuni, sum fer til nýtslu.

Útlit til búskaparvøkstur í 2011 og 2012 men lægri enn áður væntað Tað, at húsarhaldini verða trygg við at hækka nýtsluna nakað, hevur við sær, at avgjaldsinntøkur hjá landinum kunnu vaksa skjótari enn BTÚ. Konjunkturgongdin fer tí at minka nakað um landskassahallið. Harumframt kann hallið minkast við átøkum sambært gjørdum ætlanum uttan at taka burtur allan búskaparvøksturin. Hetta er ynskiligt fyri at almenna skuldin framvegis verður á einum hóskiligum stigi, soleiðis at Føroyar framhaldandi tola sveiggj í búskapinum uttan at missa álit frá egnum borgarum og lánveitarum.

Arbeiðsloysið er í løtuni 6-7% og útlit til lækkandi arbeiðsloysi Arbeiðsloysið við endan av 2010 varð ávirkað av húsaganginum hjá Faroe Seafood. Árstíðarjavnað var arbeiðsloysið 7,3% í februar í ár, tá tað var mest, og er síðan komið niður aftur á 6,6% í juli. Hildið verður, at arbeiðsloysið kann lækka meira, tí at útlit eru til meira virksemi á fleiri økjum.

# 2. MØGULEIKAR AT BROYTA FISKIVINNUSKIPANINA

## 2.1 INNGANGUR

Lønsemið hevur verið vánaligt í fleiri ár í heimligu fiskivinnuni, m.a. orsakað av at toska- og hýsustovnurin á Landgrunninum eru smáir og illa fyri. Tíbetur er toskastovnurin vaksandi, men støðan er verri hjá hýsustovninum, sum er so lítil sum ongantíð áður. Gýtingastovnarnir eru somuleiðis so smáir sum ongantíð áður.[1]

Skal lønsemið í fiskivinnuni batna, verður neyðugt framhaldandi at menna stovnsrøktina og yvirhøvur at troyta fiskastovnar burðardygt. Harafturat ber til at broyta loyvisskipanina líðandi í eini skiftistíð á nøkur ár. Fyrimunirnir við at troyta fiskastovnar burðardygt eru eyðsýndir. Størstu nøgdirnar fáast úr fiskastovnum yvir tíð, tá ið fiskiskapur og roynd eru burðardygg. Harafturat fæst hægri prísur, um fiskiskapurin er góðkendur sum burðardyggur, umframt at váðin verður minni fyri allar luttakarar í fiskivinnuni.

### 2.1.1 Burðardyggleiki og stovnsrøktin eru grundarlagið

Fremsta endamálið við og grundarlagið undir allari fiskivinnuumsiting má vera stovnsrøktin. Tær broytingar í loyvisskipan o.a., sum verða umrøddar í frágreiðingini, fáast helst bara at virka sum ætlað, verða stovnar troyttir burðardygt. Verða stovnar ikki troyttir burðardygt, verður óvissan stór fyri allar luttakarar í fiskivinnuni. Tað verður at kalla ógjørligt at áseta virðið á fiskirættindum, tí vandi tá er fyri, at fiskidagar, kvotur, fiskiskapur o.a. minka í framtíðini, og óvissan um fiskidagar, kvotur o.tíl. í framtíðini verður eisini stór.

**Feskfiskiveiði í føroyskum sjógvi, býtt á fiskasløg, 1993-2010** **MYND 2.1**




Kelda: Hagstova Føroya.

Nøgdirnar, sum verða fiskaðar í føroyskum sjógvi, eru minkaðar nógv síðstu árini. Hetta er serliga galdandi fyri botnfiskasløgini, sum heimaflotin fiskar. Mynd 2.1 vísir, at nøgdirnar hava verið um 100 tús. tons við hampuliga stórum sveiggjum síðstu árini. Á myndini sæst eisini, at verður sæð burtur frá upsa og gulllaksi, eru nøgdirnar minkaður nógv síðstu árini. Fallið í nøgdum er fremsta orsøkin til vánaliga lønsemið, sum hevur verið í heimaflotanum síðstu árini. Oljuprísir eru eisini hækkaðir, meðan fiskaprísir sum heild

[1] Sí [12].

hava verið støðugir ella eru hækkaðir nakað. Mynd 2.1 vísir vánaliga fiskiskapin, sum hevur verið eftir teimum týðandi botnfiskasløgunum, toskur, hýsa o.tíl., síðstu árini.

Ein orsøk til smáu stovnsstøddir á toski og hýsu er, at tað ikki í nóg stóran mun hevur eydnast at avmarka royndina síðstu umleið 15 árini. Tá ið fiskidagaskipanin byrjaði í 1996, var eitt av tilmælunum frá Skipanarnevndini, at ikki skuldi fiskast meira enn 1/3 av fiskinum í tali úr stovnum árliga, og at gýtingarstovnar skuldu ikki vera minni enn eitt ávíst minstamark.[2] Tilráðingin stavaði frá lívfrøðiliga atlitinum í grein 2 í lóg um vinnuligan fiskiskap.

Politisk undirtøka var fyri at miða eftir tilráðingini í størst møguligan mun. Tilmælið er eitt mál fyri veiðitrýst á teir týðandi botnfiskastovnarnar undir Føroyum, sum miðað eigur at verða eftir.[3] Fyri tosk og upsa hevur veiðitrýstið sum heild verið hægri enn tilætlaða veiðitrýstið, síðani fiskidagaskipanin byrjaði. Afturat nógvu royndini, eru aðrar natúrligar frágreiðingar, sum hava ávirkað fiskiskapin, t.d. skiftandi gróðrarumstøður í sjónum, kapping millum fiskasløg um føðigrundarlagið og aðrar broytingar í havumhvørvinum. Ein onnur óvissa er, hvussu makrelstovnurin, sum í størri mun enn áður hevur verið at sæð í føroyskum sjógvi, ávirkar tilgongdina til botnfiskastovnarnar undir Føroyum.

### 2.1.2 Væleydnað fiskivinnuumsiting á fleiri økjum

Fleiri tættir í føroyskari fiskivinnuumsiting eru kortini væleydnaðir. Gransking í fiskasløgum og vistskipanum í føroyskum havøki er á høgum stigi. Hagtøl og skrásetingar eru á høgum stigi, og eftirlitsskipanir eru sum heild góðar. Afturat hesum fáa myndugleikar lívfrøðilig tilmæli á høgum stigi umvegis samstarvið millum Havstovu og ICES, og tilráðingin er eisini alment atkomilig.

Fleiri fyrimunir eru við fiskidagaskipanini sum skipan, m.a. at lítil orsøk er at blaka fisk út o.tíl. Harafturat eru skipanir, t.d. friðingar av økjum og *ringurin*, sum býtir landleiðirnar í *innaru* og *ytru* landleiðir, sum halda reiðskap og skipabólkar toluliga væl atskild. Útróðrar- og línuflotin royna fyri tað mesta á innaru landleiðunum, meðan par- og djúpvatnstrolarar fyri tað mesta royna á ytru landleiðunum. Tílíkar skipanir eru við til at avmarka royndina og eru eitt amboð at stýra veiðitrýstinum.

Kortini hevur lønsemið í heimligu fiskivinnuni og í fiskavirkisvinnuni verið vánaligt í fleiri ár, og royndin eftir teimum týðandi botnfiskasløgum undir Føroyum hevur verið størri enn tilætlað, síðani fiskidagaskipanin byrjaði. Tí bendir nógv á, at tá ið umræður lønsemi og burðardyggleika, hevur føroysk fiskivinnuumsiting ikki verið serliga væleydnað, hóast fleiri aðrir tættir í fiskivinnuumsitingini eru væleydnaðir (her verður hugsað um heimligu fiskivinnuna).

Fiskiskapurin eftir toski, hýsu og upsa í føroyskum sjógvi er t.d. ikki góðkendur sum burðardyggur av MSC ella av øðrum líknandi stovnum. Krøv frá (enda)brúkarum um

---

[2] Kelda: [14]. ICES mælir til at miða eftir einum lægri veiðitrýsti á 25% av toskinum í tali um árið í miðal, sum svarar til eitt veiðitrýst (fiskideyða) á F = 0,32.

[3] Tilmælið frá Skipanarnevndini um at veiða í mesta lagi 33% úr fiskastovnum í tali árliga svarar til eitt veiðitrýst (fiskideyða) á F = 0,45. Síðstu umleið 30 árini hevur veiðitrýstið fyri tosk á Landgrunninum flestu árini verið hægri, millum F = 0,5 og F = 0,8. Sí [12], [19] og [14]. Síðani miðskeiðis í 1990'unum hevur veiðitrýstið fyri tosk á Landgrunninum verið um 39% í miðal, sum svarar til F = 0,56. Árini 2008 til 2010 hevur veiðitrýstið verið lægri, um 31%, sum svarar til F = 0,41, sí [19].

burðardyggleika fara óivað at vaksa næstu árini, og tí er neyðugt, at føroysk fiskivinna verður góðkend sum burðardygg, skulu fiskivinnufyritøkur fáa hægst møguligan prís fyri fiskavørurnar.[4]

Eitt áhugavert fyribrigdi er, at lønsemið í heimligu fiskivinnuni hevur verið vánaligt í fleiri ár, *hóast* vinnan hevur verið stuðlað við fleiri beinleiðis og óbeinleiðis stuðulsskipanum, t.d. sjómannafrádrátti og inntøkutrygd, sum nú er flutt úr landskassanum. Stuðulsskipanir o.tíl. verða ikki viðgjørdar her, men víst kann í staðin verða á, at hesar eru viðgjørdar fleiri ferðir áður, m.a. í várfrágreiðingini 2011.

Havandi í huga, at fleiri týðandi tættir í føroyskari fiskivinnuumsiting eru væleydnaðir, eru allar orsøkir at halda, at til ber at bøta um lønsemið í føroyskari fiskivinnu. Ein skipan sum fiskidagaskipanin krevur í fyrra lagi, at talið av døgum, veiðiloyvum og veiðiorka verða stillað rætt frá byrjan av. Í øðrum lagi krevur skipanin, at talið av døgum verður lagað til ta tøkniligu menning, sum fer fram í reiðskapi og vinnutólum, og sum fer fram, sama hvør stýriskipan verður nýtt at stýra royndini við.

Síðani fiskidagaskipanin byrjaði, er talið av veiðiloyvum í bólkunum 1 til 4 minkað úr umleið 150 til umleið 100, harav øll eru ikki virkin vinnuliga.[5] Talið av veiðiloyvum í bólkunum 5A og 5B er hinvegin vaksið síðstu árini úr umleið 500 fyri fiskiárið 2007/08 til umleið 700 fyri fiskiárið 2010/11, harav øll eru ikki virkin vinnuliga.[6] Afturat hesum kemur, at talið av veiðiloyvum og fiskidøgum í bólki 3 er at kalla tað sama í dag, sum tá ið fiskidagaskipanin byrjaði, hóast veiðiorka fyri hvørt skipið er vaksin hesi árini.

Talið av fiskidøgum tilsamans í fiskidagaskipanini er minkað úr umleið 43 tús. dagar til umleið 28 tús. dagar, ella ein minking á umleið 36%, umframt minkingina, sum varð samtykt fyri fiskiárið 2011/12.[7] Orsakað av tøkniligari menning, betri reiðskapi o.tíl., er torført at meta, um veiðiorkan er minkað hesi umleið 15 árini, fiskidagaskipanin hevur verið nýtt sum stýriskipan.[8]

Til ber eisini at staðfesta, at flestu skipabólkar hava brúkt 70 til 80% av tillutaðu døgunum í miðal árliga, og serliga hjá útróðrarflotanum hava nógvir avlopsdagar verið. Hetta bendir á, at tillutaðu dagarnir hava ikki verið avmarkandi fyri royndina, hóast tað kunnu vera nógvar orsøkir til, at allir dagarnir í skipanini ikki verða brúktir.

Ein óheppin eginleiki við fiskidagaskipanini er, at tað er neyðugt yvir tíð at *minka* talið av fiskidøgum og veiðiloyvum í skipanini, so hvørt tøknilig menning fer fram. Tillagingin av

---

[4] Búskaparráðnum kunnugt, er tað einki í fiskidagaskipanini sjálvari, sum forðar fyri, at fiskiskapurin eftir botnfiski undir Føroyum verður góðkendur sum burðardyggur. Heldur er orsøkin ov høgt veiðitrýst sammett við, hvat er at meta sum ein burðardygg roynd, umframt at veiðisetningar, umsitingarætlanir og recovery plan o.tíl. verða ikki nýtt í umsitingini av fiskiskapinum eftir týðandi botnfiskasløgum undir Føroyum.

[5] Bólkarnir síggjast í talvu 2.1 á bls. 19.

[6] Fyri fiskiárið 2007/08 vóru 124 veiðiloyvi í bólki 5A og 356 í bólki 5B. Fyri fiskiárið 2010/11 vóru 74 veiðiloyvi í bólki 5A og 633 í bólki 5B. Kelda: Fiskidaganevndin, úr [5].

[7] Kelda: Fiskidaganevndin, úr [5].

[8] Í sambandi við talið av fiskidøgum o.tíl., skal verða havt í huga, at fiskidagar eru umsetiligir innanfyri ávís mørk og kunnu avhendast millum høvuðsbólkar, tá ið tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum. Bólkur 5 er undantikin, og loyvt er heldur ikki at avhenda dagar, ætlaðir til húkaveiðu, til trolveiðu ella øvugt. Tí er trupult at meta um, hvussu royndin tilsamans er ávirkað av, at talið av døgum er minkað, síðani fiskidagaskipanin byrjaði.

døgum í fiskidagaskipanini kann tí mestsum bara vera *niðureftir*, sum er óheppið. Royndirnar síðani fiskidagaskipanin byrjaði vísa, at fiskidagaskipanin hevur verið torfør at stilla lívfrøðiliga rætt. Ein orsøk til hetta er, at tað er torført at tillaga talið av døgum, við tað at hetta amboðið rakar øll fiskifør í skipanini eins hart, og ávirkar tey, sum hava lønandi rakstur eins væl og onnur fiskifør. At ov nógv veiðiorka helst var í skipanini frá byrjan av sammett við eina burðardygga roynd hevur heldur ikki gjørt skipanina lættari at umsita.

## 2.2 BROYTINGAR Í LOYVISSKIPANINI

Her verða nakrar broytingar, sum kunnu verða gjørdar í loyvisskipanini, lýstar í stuttum. Fleiri veikleikar eru við verandi loyvisskipan, sum vórðu lýstir í várfrágreiðingini 2011, umframt at gjørt varð vart við vansar í loyvisskipanini í várfrágreiðingini 2000. M.a. varð víst á, at nógvur kapitalur skal til fyri at fáa hendur á fiskirættindum, og fiskivinnan er tí ikki serliga atkomilig hjá teimum, sum vilja royna seg í vinnuni ella vilja víðka um sítt virksemi.

Eitt endamál við teimum tillagingum, sum verða lýstar her, er at broyta loyvisskipanina, soleiðis at hon í stigum verður meira *marknaðarlig* og *kappingarfremjandi*. Eitt annað endamál er at minka um váðan í fiskivinnuni fyri eigarar av fiskiførum og fyri fíggingarstovnar, sum eru við til at fíggja virksemið í fiskivinnuni.

Í verandi loyvisskipan lutar tað almenna fiskirættindi út *politiskt fyrisitingarliga* heldur enn eftir marknaðarligum treytum. Ein læra úr heimssøguni er, at marknaðarbúskapur, hóast síni lýti, er frægasta skipan vit hava, tá ið umræður búskaparvøkstur og gjøgnumskygda politiska skipan. Veikleikar við verandi skipan eru harafturat vorðnir greiðir í sambandi við býtið av rættindum at fiska makrel í føroyskum sjógvi í 2010 og í 2011.

Býtið av rættindum at fiska makrel vísir, at tað er at kalla ógjørligt politiskt fyrisitingarliga at býta rættindi til ávísan fiskiskap á ein hátt, sum verður fataður sum rættvísur, serliga tá ið tað er trupult at vísa á søguligan fiskiskap eftir ávísum fiskaslagi á ávísum øki. Í lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 2, stk. 3, verður gjørt greitt, at "*ein meginregla í umsitingini av tilfeingi, ið ikki er avmarkað av altjóða- ella øðrum avtalum, sum Føroyar er partur í, er at veita so frælsa atgongd til hetta tilfeingi sum gjørligt fyri fiskifør undir føroyskum flaggi.*" Verandi loyvisskipan er neyvan sambærilig við hesa áseting.

Í sambandi við broytingar, sum kunnu gerast í føroysku loyvisskipanini, er umráðandi, at tær verða framdar á ein skipaðan hátt og í eini *skiftistíð*, soleiðis at vinnan fær tillagað seg til eina nýggja loyvisskipan og framhaldandi gjørt íløgur, sum eru neyðugar. Tað er eisini umráðandi at gera sær greitt, at skulu teir týðandi botnfiskastovnarnir undir Føroyum vaksa aftur næstu árini, má royndin verða minkað eitt ávíst tíðarskeið; helst í eitt til trý ár. Skal royndin verða minkað, ávirkar tað partar av flotanum, og tað er ikki óhugsandi, at t.d. útróðrarvinna verður hart rakt av tílíkum tillagingum.

Tílíkar tillagingar í flotanum eiga at verða framdar á ein virðiligan og lagaligan hátt fyri tey, sum eru í vinnuni og hava gjørt íløgur í vinnuna. Tað almenna kann á ymsan hátt stuðla fiskimonnum, sum leita sær í aðrar vinnur. Í øllum førum er greitt, at arbeiðsloysið er í løtuni 6-7%, og tí eru arbeiðsmøguleikar í øðrum vinnum helst nakað avmarkaðir, hóast fleiri vinnur á landi siga seg tørva arbeiðsmegi. Skal talið av fiskiførum minka,

soleiðis at tað munar, verður helst eisini neyðugt at geva fiskiførum betri møguleikar at avhenda fiskirættindi og sum heild at gera fiskirættindi meira umsetilig, enn tey eru í verandi skipan.

### 2.2.1 Stutt um ognarrættin til livandi tilfeingið í havinum

Áðrenn loyvisskipanin verður umrødd nærri, er hóskandi at greiða frá, hvussu Búskaparráðið fatar ognarrættin til livandi tilfeingið í havinum. Hvussu hesin ognarrættur verður lýstur er avgerandi fyri, hvørjar loyvis-, stýris- og eftirlitsskipanir o.tíl. tað almenna kann seta í verk fyri vinnuligan fiskiskap og fyri at handhevja ta lóggávu, sum er galdandi fyri vinnuligan fiskiskap.

Viðvíkjandi ognarrættinum til livandi tilfeingið í havinum skal verða havt í huga, at sjálvur *ognarrætturin* er torførur at lýsa nágreiniliga í sínum vanliga týdningi. Ferðandi fiskastovnar ferðast í sjóøki hjá fleiri ymsum londum (t.e. innanfyri 200 fjórðinga sjómarkið) og í altjóða sjógvi. Ognarrætturin er harafturat torførur at *handhevja*, orsakað av møguleikum sum kunnu vera at reka ólógligan og ófráboðaðan fiskiskap.[9] Ognarrætturin til sjálvt tilfeingið kann tí illa lýsast í vanliga týdninginum; hinvegin ber til at lýsa *brúksrættindi* til livandi tilfeingið í havinum.

Tað almenna lutar út *brúksrættindi* til tilfeingið í havinum, sum *samfelagið sum heild* er upprunaeigari av. Lógin um vinnuligan fiskiskap og ST-havrættarsáttmálin leggja greidliga upp til, at landið, tað almenna, umsitur tilfeingið í havinum vegna eigaran, samfelagið alt ella Føroya fólk.[10] Dømi um hetta er ofta nýtta orðingin úr grein 2, stk. 1, í lóg um vinnuligan fiskiskap um "[...] *ogn Føroya fólks*". *Brúksrættindi* til tilfeingið eru latin privatum, og hesi brúksrættindi hava verið galdandi í skiftandi tíðarskeið, síðani lóg um vinnuligan fiskiskap varð sett í gildi í 1994. Hóast hetta hevur tað almenna ikki vegna eigaran, samfelagið sum heild, latið privatum *ognarrættin* til livandi tilfeingið í havinum.

Í grein 3, stk. 2, í lóg um vinnuligan fiskiskap verður eisini sagt, at "*fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rættindi til fiskiskap takast aftur uttan endurgjaldsskyldu*". Henda tulking av ognarrættinum er einasta tulking, sum er sambærilig við skyldurnar í ST-havrættarsáttmálanum um umsiting av fiskastovnum á ein slíkan hátt, at teir eru ikki í vanda fyri at verða niðurfiskaðir.[11] Nevnda tulking omanfyri av ognarrættinum er eisini neyðug, skal nakað høpi vera í teimum mongu tiltøkum, skyldum o.a., sum tað almenna setur í verk og áleggur fiskivinnuni fyri at avmarka royndina á fiskastovnar, fyri at handhevja lóggávu og hava eftirlit við fiskiskapinum o.tíl., jvb. lóg um vinnuligan fiskiskap og ST-havrættarsáttmálan.

---

[9] Sí eisini [9].

[10] Í grein 56 í ST-havrættarsáttmálanum stendur t.d., at "In the exclusive economic zone, *the coastal State* has sovereign rights for the purpose of exploring and exploiting, conserving and managing the natural resources, whether living or non-living, of the waters superjacent to the seabed and of the seabed and its subsoil [...]".

[11] Í grein 61 í ST-havrættarsáttmálanum verður m.a. sagt, at "*The coastal State* shall determine the allowable catch of the living resources in its exclusive economic zone. [...] *The coastal State*, taking into account the best scientific evidence available to it, shall ensure through proper conservation and management measures that the maintenance of the living resources in the exclusive economic zone is not endangered by over-exploitation. [...] Such measures shall also be designed to maintain or restore populations of harvested species at levels which can produce the maximum sustainable yield, as qualified by relevant environmental and economic factors, including the economic needs of coastal fishing communities and the special requirements of developing States [...]".

Søguliga sæð hava aðrar tulkingar av ognarrættinum til livandi tilfeingið í havinum verið galdandi og meira natúrligar at nýta. Fram til 1960'ini var reiðskapur ikki so effektivur sum nú, og fiskastovnar vóru ikki í vanda fyri at verða niðurfiskaðir. Livandi tilfeingið í havinum var ikki eitt avmarkað tilfeingi, og á flestu leiðum var at kalla frítt at fiska. Tílíkar tulkingar av ognarrættinum eru ikki viðkomandi í dag, við tað at tilfeingið er eitt *avmarkað tilfeingi*. Neyðugt er tí at avmarka royndina á fiskastovnar, jvb. lóg um vinnnuligan fiskiskap og ST-havrættarsáttmálan.[12]

### 2.2.2 Fiskirættindi kunnu lutast út á almennum uppboði

Sum er, verður avgjørt *politiskt fyrisitingarliga*, hvussu brúksrættindi til livandi tilfeingið í havinum verða lutað út. Búskaparráðið og onnur hava fleiri ferðir víst á, at fyri upprunaeigaran, samfelagið alt, hevði ein marknaðarlig skipan verið betri. Tað almenna kundi t.d. lutað brúksrættindi út á uppboði, eins og gjørt varð við ein part av rættindunum at fiska makrel í føroyskum sjógvi í ár.

Vinnulívið – herundir fiskivinnan – eigur at hava støðugar karmar og lóggávu at virka innanfyri. Støðugir karmar lata seg bara gera við eini skipan, sum verður fatað sum rættvís og gagnlig fyri lønsemið samstundis. Útlitini fyri varandi undirtøku undir verandi skipan eru ivasom. Tí verða ávísar broytingar neyðugar, skal vinnan hava støðugar karmar og lóggávu at virka innanfyri.

Fiskirættindi eru sum kunnugt handilsvøra í verandi skipan við umsetiligheit. Fiskirættindi verða keypt og seld á einum marknaði fyri víðarisølu, sum er óskipaður og gruggaður av, at veiðiloyvi eru knýtt at ávísum fiskiførum. Tá ið fiskifør skifta eigara, er vanligt, at fiskifør verða seld fyri fleiri ferðir virðið á sjálvum skipinum. Tey, ið byrja uppá virksemi í fiskivinnuni ella vilja víðka um sítt virksemi, rinda tí fyri rættindi at fiska, sum er. Ein fyrimunur við eini skipan við uppboðssølu er, at marknaðurin fyri fiskirættindi hevði verið meira gjøgnumskygdur enn í verandi skipan, og virðið á fiskirættindum hevði verið greiðari.

Møguleikar eru sum kunnugt í lóg um vinnuligan fiskiskap at gera broytingar í loyvisskipanini í sambandi við, at fiskirættindi kunnu setast úr gildi 1. januar 2018, jvb. lóg um vinnuligan fiskiskap. Fiskivinnan eigur at hava støðugar karmar at virka innanfyri. Hetta er umráðandi, skal fiskivinnan skapa virðisøking uppá longri sikt og gera íløgur í nýggja tøkni, framleiðsluorku o.tíl.

Tí verður skotið upp at broyta loyvisskipanina líðandi í eini skiftistíð á t.d. 5 ár, soleiðis at feløg í fiskivinnuni fáa møguleika at laga seg til eina nýggja loyvisskipan. T.d. ber til hjá landinum at endurnýggja meginpartin av verandi fiskirættindum eftir 1. januar 2018 árliga, meðan landið samstundis letur ein vaksandi part av fiskirættindunum verða seld á uppboði. Ein lagalig skiftistíð, sum er fráboðað og løgd til rættis frammanundan, verður óivað neyðug, skal fiskivinnan ikki verða læst føst í verandi bygnaði. Tað er eisini greitt, at broytingar í loyvisskipanini, sum tær, sum verða skotnar upp her, helst eru ov umfatandi at verða settar í verk eftir stuttari tíð.

---

[12] Sí eisini [9].

Eitt dømi er, at landið seldi 20% av øllum fiskirættindum á uppboði um árið yvir fimm ár, soleiðis at fyrsta árið vórðu 20% seld á uppboði, meðan loyvishavarar varðveita 80% av rættindunum. Næsta árið kunnu 40% seljast, meðan loyvishavarar varðveita 60% av rættindunum o.s.fr. Eftir døminum varð ein tílík skipan sett í verk eftir 5 árum. Fyri ikki at avlaga kappingina í fiskivinnuni, kann tilfeingisgjald verða lagt á tey fiskirættindi, sum í skiftistíðini verða lutað út eftir sama leisti sum í verandi skipan. Tað verður óivað neyðugt at eftirmeta skipanina árliga í skiftistíðini, og um neyðugt kann skipanin tillagast.

Longdin á fiskirættindum, kvotum, fiskidøgum o.a., kann t.d. vera eitt ár, men til ber eisini at hava longri rættindi í skipanini, t.d. trý ella fimm ára rættindi. Dømið um skiftistíð á 5 ár, sum er víst omanfyri, byggir á, at skiftistíðin byrjar, tá ið verandi loyvi fara úr gildi og fella aftur til landið. Ein annar møguligur leistur er, at skiftistíðin byrjar áðrenn, og at longri rættindi verða boðin út, sum eru galdandi eftir 1. januar 2018. Arbeiðið at fyrireika lóggávu og leggja skiftistíð til rættis eigur at byrja sum skjótast, soleiðis at landsstýrið kann boða frá í góðari tíð, hvussu lovisskipanin verður broytt og hvussu skiftistíðin verður løgd til rættis.

At enda kann verða nevnt, at í Íslandi eru ætlanir um at broyta loyvisskipanina við frítt umsetiligum eginkvotum, sum hava verið langtíðarloyvi síðani 1990. Hesi vórðu upprunaliga latin ókeypis og vórðu síðani gjørd óendalig við lóggávu í 1990.[13] Ynskini í Íslandi um broytingar í loyvisskipanini stava m.a. frá, at fiskirættindi hava savnað seg á fáum og stórum fiskivinnufyritøkum síðani 1990. Harafturat er stórur partur av fiskirættindunum miðsavnaður í økinum kring Reykjavík, og hetta hevur gjørt tað torført at reka fiskivinnu á smáplássum í Íslandi.

Ein onnur orsøk til ætlaðu broytingarnar í Íslendsku loyvisskipanini er, at Mannarættindaráðið hjá ST í 2007 kom til ta støðu, at íslendska loyvisskipanin ger mismun á fólki ein hátt, sum er ósambæriligur við grein 26 í ST-sáttmálanum um borgara- og politisk rættindi.[14] Í úrskurðinum varð m.a. sagt, at "[...] *Allocated quotas no longer used by their original holders can be sold or leased at market prices instead of reverting to the State for allocation to new quota holders in accordance with fair and equitable criteria. The State party has not shown that this particular design and modalities of implementation of the quota system meets the requirement of reasonableness.*" [15]

Mannarættindaráðið viðurkendi, at tað onkursvegna er neyðugt at gera mun á fólki, tá ið eitt avmarkað tal av fiskirættindum verður lutað út av tí almenna. Mannarættindaráðið helt kortini ikki, at at ríkisstjórnin hevði víst, at júst nýtti hátturin at luta út fiskirættindi var grundaður á rímulig eyðkenni. Fiskirættindi í Íslandi vórðu upprunaliga lutað út til tey, sum vórðu virkin í vinnuni eitt ávíst tíðarskeið (í hesum føri 1. november 1980 til 31. oktober 1983), sum upprunaliga var ætlað at vera ein tíðaravmarkaður leistur.

---

[13] Lög nr. 38/1990 um stjórn fiskveiða. Sí eisini [17], www.fisheries.is/management/fisheries-management/ og FiskeribladetFiskaren, 16.05.11, bls. 14-15.

[14] Sí [22]. Í grein 26 í ST-sáttmálanum um borgara- og politisk rættindi verður sagt, at "All persons are equal before the law and are entitled without any discrimination to the equal protection of the law. In this respect, the law shall prohibit any discrimination and guarantee to all persons equal and effective protection against discrimination on any ground such as race, colour, sex, language, religion, political or other opinion, national or social origin, property, birth or other status."

[15] Úrskurðurin kann lesast í [22].

### 2.2.3 Hvussu ein uppboðssøla av rættindum kann skipast

Fyri at tryggja, at mest møgulig kapping verður millum feløg, sum bjóða uppá fiskirættindi, verður neyðugt við ávísum tiltøkum. Eisini má tryggjast, at uppboðssølan verður so atkomilig sum gjørligt hjá feløgum. Fyri at tryggja sum mest av kapping kunnu uppboðssølurnar vera anonymar fyri bjóðarar. Upplýsingar um boð, keyparar, søluprísir o.tíl. kunnu síðani gerast almennar eftir sølurnar. Hesin leistur varð nýttur, tá ið rættindi at fiska makrel í føroyskum sjógvi vórðu seld á uppboði í ár.

Til ber at áseta, at gjaldið fyri rættiindini fellur til gjaldingar, tá ið skip avreiða, heldur enn áðrenn farið verður at fiska. Harvið fáa feløg, sum eru væl fyri fíggjarliga, minni fyrimun framum onnur feløg. Ein vandi er tá, at feløg keypa fleiri rættindi inn undir seg, enn tey hava fiskiorku at troyta. Tí verður helst neyðugt, at feløg gjalda fyri fiskirættindini, sama hvussu fiskiskapurin hilnast, t.e. at goldið verður ikki eftir avreiddum nøgdum.

Fyri at tryggja, at feløg hava møguleika at rinda fyri og gagnnýta tey fiskirættindi, sum bjóðað verður uppá, ber til at áseta, at feløg veita trygd fyri keypsupphæddum á uppboðssøluni ella fyri ávísan part av keypsupphæddunum. Gjaldið eigur sostatt at vera á rættin at gagnnýta eitt tilfeingi og ikki á avreiddar nøgdir. Eftir eina tíð venja feløg seg óivað við, at fiskirættindi skulu prísásetast sum *ein rættur at gagnnýta eitt tilfeingi eina ávísa tíð*, og at vandi tí er fyri, at fiskiskapurin hilnast verri enn væntað.

Enn ein leistur, sum kann umhugsast, fyri at forða fyri, at rættindi savnast hjá fáum eigarum, er at áseta krøv um spjaðing av fiskirættindum og hámark fyri, hvussu nógv fiskirættindi einstøk feløg í mesta lagi kunnu ogna sær. Eitt annað amboð er kappingarlóggáva, sum kann tryggja, at sum mest av kapping verður í skipanini.

Fyri at geva feløgum møguleika at avhenda fiskirættindi, sum tey ikki kunnu gagnnýta, er umráðandi, at umsetiligheitin í verandi skipan verður varðveitt. Til ber at gera marknaðin fyri víðarisølu av rættindum meira gjøgnumskygdan, t.d. við krøvum um at hesi skulu keypast og seljast á einum skipaðum marknaði. Umsetiligheitin er umráðandi, skulu feløg ikki verða læst fast í fiskivinnuni uttan møguleika at avhenda fiskirættindi.

Neyðugt verður eisini at taka støðu til, hvørjar treytir skulu setast feløgum, sum fáa loyvi at bjóða uppá rættindi á eini tílíkari uppboðssølu. Hugsandi treytir eru ognarskapur av føroyskt skrásettum fiskifari, sum lýkur teknisk og skipaeftirlitskrøv. Fyri at skipanin skal vera so lagalig og smidlig sum gjørligt, kann vera skilagott at geva feløgum loyvi at flagga skip inn í flotan og at leiga skip sínamillum, sum lúka teknisk og skipaeftirlitskrøv. Til ber eisini at áseta treytir um føroyska manning og føroyskar sáttmálar á skipum, sum møguliga verða flaggað inn í flotan.

Treytir kunnu eisini verða settar til reiðskap og til, hvørji sløg av fiskiførum kunnu nýtast at troyta ymisk fiskirættindi o.tíl. Treytir kunnu eisini setast til feløgini sjálvi, at tey eru skrásett og rinda skatt í Føroyum. Politiskt ber eisini til at áseta krøv um, at eitt ávíst minstamark av partapeninginum í feløgum skal hava føroyskan eigara o.s.fr.

Ein eginleiki við eini skipan við uppboðssølu er, at váðin í fiskivinnuni minkar sammett við verandi skipan. Vandin fyri at fiskirættindi verða skeivt virðismett í verandi skipan er stórur, við tað at íleggjarar skulu meta um fiskiskap, fiska- og oljuprísir fleiri ár fram í

tíðina. Vórðu rættindi t.d. seld árliga eftir eini skipan við uppboðssølu, varð váðin í stóran mun fluttur á landskassan. Virðið á fiskirættindum høvdu tá sveiggjað alt eftir, hvussu fiskiskapur og fiska- og oljuprísir sveiggja.

#### *2.2.3.1 Nakrar royndir av tílíkum skipanum*

Sum greitt varð frá í várfrágreiðingini 2011 vórðu skipanir við uppboðssølu royndar í Russlandi og Estlandi árini 2001 til 2003. Ein leistur við uppboðssølu av rættindum verður eisini lutvíst nýttur í Kili, í statinum Washington í USA og á Falklandsoyggjum. Harafturat eru royndir gjørdar at luta út rættindi til makrelfiskiskap í føroyskum sjógvi í ár, umframt at ætlanir eru at royna eina skipan við uppboðssølu av fiskirættindum í Íslandi sum liður í at broyta loyvisskipanina har.

Tað er torført at vísa á viðkomandi royndir av tílíkum skipanum, við tað at uppboðssølur av fiskirættindum eru ikki royndar enn í okkara grannalondum.[16] Royndarskipanin fyri útluting av rættindum at fiska makrel í ár vísti, at tað tøkniliga ber til at luta út eftir hesum leisti, hóast tað er ov tíðliga at gera endaligar niðurstøður um royndarskipanina og lærir av henni enn.

Greitt er, at verður ein skipan við uppboðssølu av fiskirættindum sett í verk, má ein tílík skipan fyrireikast væl. Royndirnar úr Russlandi vísa, at verða tílíkar skipanir ikki væl fyrireikaðar er vandi fyri, at tær ikki virka sum ætlað. Skipanin í Russlandi fekst ikki at virka sum ætlað orsakað av, at fiskivinnan fekk ikki neyðugu tíðina at laga seg til nýggju skipanina. Harafturat var ov lítið eftirlit við fiskiskapinum og við hjáveiði, soleiðis at til bar at royna eftir øðrum fiskasløgum enn teimum, sum fiskirættindini góvu rætt til at royna eftir.[17]

Skipanin í Estlandi varð roynd í 2001 og í 2002. Í 2003 var farið burtur frá skipanini orsakað av, at Estland var ávegis inn í ES, og skipanin við uppboðssølu av fiskirættindum var ikki sambærilig við treytirnar, sum fiskivinnan í ES virkaði undir. M.a. orsakað av hesum og ónøgd í fiskivinnuni varð farið burtur frá skipanini aftur.[18]

Sum heild eydnaðust ávísir tættir í skipanunum, sum vórðu royndar í Estlandi og Russlandi, væl, meðan aðrir tættir eydnaðust minni væl.[19] Tøknin við interneti og framkomnum telduskipanum og forritum var ikki tøk, tá ið skipanirnar við uppboðssølum vórðu royndar árini 2001 til 2003. Tí bar ikki til at hava uppboðssølur, sum vóru anonymar fyri bjóðarar. Bjóðarar kundu tí samskipa boð sínamillum á uppboðssølunum og gera avtalur sínamillum um prísir o.tíl.[20]

## 2.3 ONNUR FYRIBRIGDI AT TAKA STØÐU TIL

Her skal stutt verða víst á nøkur viðurskifti, sum kundu verið broytt fyri at bøta um lønsemið í fiskivinnuni. Stuðulsskipanir o.tíl. verða ikki viðgjørdar her, men víst kann í

---

[16] Sí meira í [1], [4], [18], [21] og [23].

[17] Sí meira í [1].

[18] Sí meira í [4] og [23].

[19] Royndirnar úr Estlandi og Russlandi eru lýstar í [1], [4] og [23].

[20] Sí [4].

staðin verða á várfrágreiðingina 2011. Mælt verður framvegis til at strika stuðulsskipanir og aðrar forðingar fyri kapping og fríari tillaging í fiskivinnuni, og hetta eigur at verða gjørt sum liður í at gera fiskivinnina burðardyggari og meira lønandi.

### 2.3.1 Áseting av TAC og mest loyvda dagatali

Í Føroyum ásetir Løgting talið av fiskidøgum í fiskidagaskipanini á hvørjum ári og býtir fiskidagarnar á skipabólkar. Landsstýrismaðurin evnar fyrst eitt uppskot til grundað á ráðgeving frá Havstovu og Fiskidaganevnd. Løgting tekur síðani støðu til og tillagar uppskotið. Í okkara grannalondum, Íslandi og Noregi, verður mest loyvda veiði, TAC, ásett av fiskimálaráðunum, og henda skipan verður nýtt í flest øllum fiskivinnutjóðum í heiminum.[21]

Tað er torført hjá løgtingi at taka atlit at langtíðarstøðuni hjá fiskastovnum, tá ið fiskidagar verða ásettir. Hinvegin kann tað lættliga gerast ein politiskur spurningur, um tað er meira ynskiligt at taka á seg vandan fyri niðurfisking, heldur enn eina ógvusliga minking í fiskidøgum her og nú, verður t.d. neyðugt at minka talið á fiskidøgum ógvusliga fyri at verja fiskastovnar.

Sum víst varð á í várfrágreiðingini 2011 vanta veðisetningar og umsitingarætlanir fyri teir týðandi fiskastovnarnar í føroyskum sjógvi. Í Íslandi verða veiðisetningar nýttir fyri fiskiskapin eftir toski, lodnu og sild. Fyri fiskiárið 2008/09 varð t.d. mest loyvda veiði fyri tosk undir Íslandi fyrstu ferð ásett eftir veiðisetninginum, at TAC'ið eitt ávíst ár er miðal av TAC'num árið fyri og 20% av stovnsstøddini.[22] Fyri fiskiskapin eftir lodnu er veiðisetningurin, at gýtingarstovnurin skal í minsta lagi vera 400 tús. tons, meðan mest loyvda veiði fyri sild verður ásett eftir eini nærri útgreinaðari reglu fyri fiskideyðan.

Veiðisetningar og umsitingarætlanir fyri tey týðandi fiskasløgini í føroyskum sjógvi høvdu óivað gagnað føroyskari fiskivinnu og umsitingini av henni. Innan fiskidagaskipanina er helst torført at umsita tílíkar veiðisetningar og umsitingarætlanir. Staðfestast kann, at tilráðingin frá Skipanarnevndini um at fiska í mesta lagi 1/3 úr fiskastovnum í miðal yvir tíð ikki er fylgt fyri fiskiskapin eftir toski og upsa. Í tilmælinum um fiskidagar fyri fiskiárið 2011/12 mælir Havstovan m.a. til at seta í gildi vísindaliga grundaðar veiðisetningar og recovery plan fyri tey týðandi botnfiskasløgini undir Føroyum.[23]

### 2.3.2 Tilráðingin frá *Skipanarnevndini* um stilling av døgum

Fiskidagaskipanin varð upprunaliga stillað fyri fiskiárið 1996/97 grundað á tilráðing frá Skipanarnevndini. Verður hugt eftir talinum av døgum fyri fiskiárið 1996/97 og verður borið saman við tilráðingina frá Skipanarnevndini sæst, at fiskidagaskipanin varð ikki stillað heilt í samsvari við ráðgevingina.

---

[21] Keldur: [17], [21] og www.fisheries.is. Onnur dømi um at mest loyvda veiði, TAC, kvotur o.tíl. verða ásett av fiskimálaráðum eru Kili, Nýsælandi, Meksiko og Suðurkorea. Innan felags fiskivinnupolitikkin í ES ásetur ES-kommisjónin mest loyvdu veiði, TAC, tey týðandi fiskasløgini í ES-sjógvi, grundað á lívfrøðiliga ráðgevingfyri. Limalondini býta síðani TAC'ið sínamillum, har ið fleiri lond hava rætt til ávísan fiskiskap.

[22] Veiðisetningurin fyri toskastovnin undir Íslandi svarar til $TAC_{t+1} = (0{,}2 \times B_{4\ \text{ár og eldri},\ t} + TAC_y) / 2$, har t er eitt ávíst árstal, og B er stovnsstøddin. Sí eisini [17] og www.fisheries.is.

[23] Sí [11].

Flestu bólkar í fiskidagaskipanini fingu á leið tað talið av døgum, sum Skipanarnevndin mælti til. Bólkur 5 fekk tó í politisku viðgerðini, sum fór fram um hetta mundið á sumri 1997, tillutaðar umleið 12 tús. fiskidagar fleiri, enn Skipanarnevndin mælti til. Talið av fiskidøgum í bólki 5 endaði tí á umleið 24 tús. fyri fiskiárið 1996/97 og 27 tús. fyri fiskiárið 1997/98, meðan Skipanarnevndin mælti til 14.700 dagar.[24] Fyri fiskiárið 2010/11 eru umleið 13 tús. dagar tilsamans í bólki 5, sum er tætt við upprunaliga tilmælið. Her skal verða havt í huga, at reiðskapur og tøkni eru betri í dag, og tí er veiðiorkan fyri hvønn fiskidagin størri í dag sammett við miðskeiðis í 1990'unum.

Ein veikleiki í skipanini er, at nógvur smáfiskur – serliga smáur toskur – verður fiskaður inni við land, sum er uppvakstrarøki hjá smáum toski og upsa. Ein orsøk til henda skeivleikan er óivað upprunaligu stillingini av fiskidagaskipanini. Útgangsstøðið hjá Skipanarnevndini var veiðisetningurin, at í miðal skuldi í mesta lagi 1/3 fiskast úr teimum týðandi fiskastovnunum í tali um árið. Sum áður nevnt, hevur veiðitrýstið í miðal, sæð burtur frá 2008 til 2010, verið hægri enn málið, sum Skipanarnevndin mælti til at miða eftir.

Føroya Reiðarafelag vísti í ársfrágreiðingini 2010 á henda skeivleika, sum kom í fiskidagaskipanina frá byrjan av.[25] T.d. vísir ein útrokning í ársfrágreiðingini, at árini 2006 til 2010 fiskaði bólkur 5 umleið 10,3 mió. fiskar í tali av toski. Línu- og garnaskip, lemma- og partrolarar tilsamans fiskaðu somuleiðis umleið 10,3 mió. fiskar í tali av toski. Avreiðingarvirðið fyri tosk hjá bólki 5 hesi árini var umleið 241 mió. kr., meðan avreiðingarvirðið hjá línu- og garnaskipum, lemma- og partrolarum tilsamans var umleið 561 mió. kr. fyri tosk.[26]

Toskaveiðan býtt á bólkar og stødd í %, 1. mai 2010 til 30. apríl 2011 — TALVA 2.1

| Bólkur | Toskur 0 | Toskur 1 7,0+kg. | Toskur 2 4,0-7,0 kg. | Toskur 3 2,0-4,0 kg. | Toskur 4 1,0-2,0 kg. | Toskur 5 0,3-1,0 kg. | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1, lemmatrolarar | 1 | 5 | 20 | 46 | 25 | 2 | 100 |
| Bólkur 2, partrolarar | 0 | 6 | 21 | 43 | 26 | 4 | 100 |
| Bólkur 3, línuskip yvir 110 tons | 1 | 11 | 22 | 31 | 27 | 8 | 100 |
| Bólkur 4A, útróðrarbátar millum 15-40 tons | 0 | 2 | 6 | 27 | 43 | 23 | 100 |
| Bólkur 4B, útróðrarbátar størri enn 40 t á línuveiði | 1 | 1 | 6 | 26 | 40 | 26 | 100 |
| Bólkur 4T, útróðrarbátar størri enn 40 t á trolveiði | 0 | 5 | 13 | 37 | 33 | 12 | 100 |
| Bólkur 6, garnaskip | 53 | 13 | 27 | 6 | 1 | 0 | 100 |
| Bólkur 5A, útróðrarbátar undir 15 tons, fullriknir* | 0 | 2 | 6 | 29 | 41 | 22 | 100 |
| Bólkur 5B, útróðrarbátar undir 15 t, ikki fullriknir* | 0 | 1 | 5 | 26 | 43 | 24 | 100 |
| Tilsamans | 0 | 5 | 13 | 32 | 34 | 15 | 100 |

* Fiskiskapurin í bólki 5A og 5B til egna nýtslu, t.e. sum ikki er avreiddur vinnuliga, er ikki við í talvuni.
**Viðm.:** Toskur 0 er ikki skildur fiskur.
**Kelda:** Fiskidaganevndin, úr [5].

Annað dømi um veiðina eftir smáum toski sæst í talvu 2.1, sum vísir, at tíðarskeiðið 1. mai 2010 til 30 apríl 2011 var útvið helmingurin (49%) av avreidda toskinum toskur 4 og toskur 5 tilsamans roknað í nøgdum. Onnur 32% vóru toskur 3. Útvið helmingurin av avreidda toskinum hetta tíðarskeiðið var sostatt toskur upp til 2 kg. roknað í nøgdum. Tað skal eisini verða havt í huga, at stórur partur av smáa toskinum upp til umleið 3 kg. fer óvirkaður av landinum.

---

[24] Kelda: Føroya Reiðarafelag, ársfrágreiðing 2009, og Fiskidaganevnd, [5]. Sí eisini [6].

[25] Sí eisini [6].

[26] Kelda: Føroya Reiðarafelag. Ársfrágreiðing 2010. Sí eisini [6].

Harafturat eru lívfrøðiligar grundgevingar at minka veiðina eftir smáfiski, við tað toskur verður kynsbúgvin um 2-4 ára aldur. Tá ið nógvur smáfiskur er í veiðini, er sjálvsagt vandi fyri, at stórur partur av fiskinum ikki kemur at gýta. Givið er, at verða munandi tillagingar gjørdar í fiskidagaskipanini fyri at minka um veiðina eftir smáfiski, fær tað avleiðingar fyri teir, sum reka útróðrarvinnu. Tílíkar broytingar eiga at verða gjørdar í stigum og á ein virðiligan og lagaligan hátt fyri tey, sum reka útróðrarvinnu og hava gjørt íløgur í hesa vinnu.

Toskaveiðan býtt á bólkar og stødd í %, 1. mai 2010 til 30. apríl 2011 — TALVA 2.2

| Bólkur | Toskur 1 (7,0+kg.) | Toskur 2 (4,0-7,0 kg.) | Toskur 3 (2,0-4,0 kg.) | Toskur 4 (1,0-2,0 kg.) | Toskur 5 (0,3-1,0 kg.) |
|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1 | 5 | 7 | 7 | 3 | 1 |
| Bólkur 2 | 18 | 25 | 20 | 12 | 4 |
| Bólkur 3 | 55 | 40 | 24 | 19 | 13 |
| Bólkur 4A | 1 | 1 | 3 | 4 | 5 |
| Bólkur 4B | 3 | 4 | 9 | 12 | 18 |
| Bólkur 4T | 6 | 7 | 8 | 7 | 6 |
| Garnaskip | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Bólkur 5A* | 8 | 10 | 19 | 26 | 32 |
| Bólkur 5B* | 4 | 5 | 10 | 16 | 21 |
| Tilsamans | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

* Fiskiskapurin í bólki 5A og 5B til egna nýtslu, t.e. sum ikki er avreiddur vinnuliga, er ikki við í talvuni.
**Kelda:** Fiskidaganevndin, úr [5].

Givið er, at skal lønsemið í heimligu fiskivinnuni batna, soleiðis at tað munar, verða politisk stig neyðug, sum m.a. hava til endamáls at minka um veiðina eftir smáfiski inni við land. Fleiri broytingar eru eisini gjørdar seinasta árið ella so, sum fara at ávirka útróðrarvinnu. Miðskeiðis í 1990'unum var nógv arbeiðsloysi, og dagarnar, sum komu í fiskidagaskipanina aftrat frá byrjan av, vórðu óivað ætlaðir at forða fyri hægri arbeiðsloysi og fráflyting. Eisini skal verða havt í huga, at arbeiðsloysisskipanin var nýggj tá og munaði lítið hjá arbeiðsleysum.

### 2.3.3 Hugtakið *felags kvota við hámarki*

Sum kunnugt verður leisturin *felags kvota við hámarki* nýttur at býta rættindi til ávísan fiskiskap. Eitt dømi er, at rættindi at fiska norðhavssild á ídnaðarskip verða býtt eftir hesum leisti. Leisturin varð eisini lutvíst nýttur at býta rættindi til makrelfiskiskap í føroyskum sjógvi í 2011. Vinnan og umsiting o.o. eru varug við, at hetta er ikki skilabesti háttur *samfelagsbúskaparliga* at luta út fiskirættindi. Her skal bara stutt verða tikið aftur í nakrar grundgevingar fyri at nýta aðrar hættir, tá ið fiskirættindi verða lutað út.

Samfelagsbúskaparliga er tað skilabesta, at fiskivinnan framleiðir mest møguliga virðisøking við at nýta minst møguliga framleiðsluorku. Hatta mál kann ikki røkkast, tá ið fiskirættindi verða lutað út sum felags kvota til fleiri skip. Undir hesum leisti verður hvørt skipið sær eggjað til at fiska sum mest, áðrenn onnur skip fiska teirra part av kvotuni, sum er felags. Til ber ikki at leggja fiskiskapin til rættis og at framleiða mest møguliga virðisøking við at nýta minst møguliga framleiðsluorku. Ein annar trupulleiki við felagskvotum við hámarki er, at tað verður torført hjá skipaeftirliti at fáa greiði á, hvørji fiskifør møguliga hava fiskað meira enn hámarkið, tá ið fleiri fiskifør eru til fiskiskap um somu tíð.

At leisturin við felagskvotum verður nýttur í fiskivinnuumsitingini er tekin um, hvussu torført tað er *politiskt fyrisitingarliga* at luta út rættindi til ávísan fiskiskap á ein rættvísan hátt. Hetta er serliga galdandi, tá ið tað er torført at vísa á søgiligan fiskiskap. Ein betri skipan hevði verið, at fiskirættindi vórðu lutað út eftir eini marknaðarligari skipan, t.d. eftir eini skipan við almennari uppboðssølu. Tá hevði borið til at lutað rættindi út sum egin árskvota á hvørt skipið ella hvørt felag sær heldur enn sum felagskvotur við hámarki á fleiri skip.

## 2.4 NIÐURSTØÐUR

Lønsemið hevur verið vánaligt í heimaflotanum í fleiri ár, og fremsta orsøkin er vánaligur fiskiskapur eftir teimum týðandi botnfiskasløgunum. Fleiri av hesum stovnum eru søguliga smáir og illa fyri í løtuni. Veiðitrýstið á toskastovnin á Landgrunninum hevur síðani fiskidagaskipanin byrjaði sum heild verið hægri enn lívfrøðiliga tilráðingin – undantikið árini 2008 til 2010.

Fyri tosk á Landgrunninum varð upprunaliga mælt til at miða eftir einum veiðitrýsti á 1/3 av toskinum í tali í miðal um árið. Síðani miðskeiðis í 1990'unum hevur veiðitrýstið í miðal verið um 39% í tali og okkurt árið munandi hægri. Fyri at fáa mest møguliga langtíðarveiði úr toskastovninum á Landgrunninum mælir ICES til at miða eftir einum veiðitrýsti á 25% úr stovninum í tali í miðal um árið.

Føroysk fiskivinnuumsiting er kortini væleydnað á øðrum økjum, men lønsemið er vánaligt, og royndin á týðandi botnfiskastovnar hevur verið størri enn lívfrøðiliga tilráðingin, síðani fiskidagaskipanin byrjaði. Tað hevði óivað gagnað føroyskari fiskivinnuumsiting, vórðu skipanir sum umsitingarætlanir (catch control rule) o.tíl., settar í verk. Ein veikleiki við fiskidagaskipanini er, at slíkar ætlanir vera torførar at umsita, við tað at eingin beinleiðis áseting er av mest loyvdu veiði (TAC) í skipanini. Skipanin ásetur hinvegin eitt *mest loyvda dagatal*.

Ein vansi við fiskidagaskipanini er, at orsakað av tøkniligari menning í reiðskapi og vinnutólum, kann stillingin av døgum mestsum bara vera niðureftir. Hetta er ein óheppin eginleiki, við tað at øll fiskifør verða eins hart rakt, tá ið talið av døgum í skipanini minkar, sama um tey hava góðan ella vánaligan rakstur. Skipanin hevur eisini víst seg at vera torfør at umsita, síðani hon varð sett í verk.

# 3. KONJUNKTURMETING

## 3.1 HEILDARMETING

BTÚ í ársins prísum vaks sambært Hagstovuni stívliga 3% í 2010 sammett við 2009. Vøksturin stavaði fyrst og fremst frá, at framleiðslan í tilfeingisvinnunum vaks, almenn nýtsla og privatar íløgur hava stimbrað eftirspurningin, meðan privat nýtsla og almennar íløgur hava tálmað.

Útlit eru til, at BTÚ í 2011 og 2012 í miðal kann vaksa 3% um árið í ársins prísum. Í búskaparmetingini frá februar varð mett, at vøksturin kundi fara at vera 5% í miðal um árið í 2011 og 2012; metingin er sostatt lækkað 2%-stig pr. ár. Høvuðsorsøkin til hetta er, at væntanir til vøkstur í privatari nýtslu og privatum íløgum eru minkaðar út frá gongdini í lyklatølum higartil í ár.

Tað er ein heldur samansett mynd, ið fæst av metta vøkstrinum í 2011 og 2012.

1. Tilfeingisvinnur geva samanlagt positivt ískoyti til vøksturin í 2011
    a. laksaaling gevur stórt ískoyti til vøkstur,
    b. makrelvinna gevur stórt ískoyti til vøkstur,
    c. botnfiskavinnur undir Føroyum kunnu geva nakað av ískoyti til vøkstur,
    d. ikki er heilt greitt, um fiskavirking á landi megnar at økja framleiðsluna,
    e. onnur fiskivinna tykist at minka í 2011
2. Innlendskur eftirspurningur gevur nakað av ískoyti til vøkstur í 2011
    a. privat nýtsla gevur nakað og privatar íløgur geva lítið av ískoyti til vøkstur
    b. almenn nýtsla og almennar íløgur geva lítið av ískoyti til vøkstur
    c. samlaði eftirspurningurin verður minkaður nakað, tí at land og kommunur sum ætlað minka hall
3. Tilfeingisvinnur geva samanlagt positivt ískoyti til vøksturin í 2012
    a. botnfiskavinnur væntast at geva ískoyti til vøkstur
    b. fiskavirking á landi væntast at geva ískoyti til vøkstur
    c. makrelvinna gevur møguliga ískoyti til vøkstur
    d. laksaaling gevur møguliga ískoti til vøkstur við øktum nøgdum, men lægri prísum
4. Innlendskur eftirspurningur væntast at geva positivt ískoyti til vøkstur í 2012
    a. privat nýtsla og privatar íløgur væntast at geva positivt ískoyti til vøkstur
    b. almenn nýtsla og almennar íløgur geva lítið ískoyti til vøkstur
    c. samlaði eftirspurningurin verður minkaður nakað, tí at land og kommunur sum ætlað minka hall

Arbeiðsloysið við endan av 2010 varð ávirkað nógv av húsaganginum hjá Faroe Seafood. Árstíðarjavnað var arbeiðsloysið 7,3% í februar í ár, tá tað var mest, og er síðan komið niður aftur á 6,6% í juli. Hildið verður, at arbeiðsloysið kann lækka meira, tí at útlit eru til meira virksemi á fleiri økjum, men tað gongur heldur trekt við at fáa virksemið uppaftur í fiskavirking, eftir at nýggir eigarar hava yvirtikið virki, sum Faroe Seafood átti.

Alt tað seinasta fjórðingsárið 2010 var ávirkað av trupulleikunum í Eik Banka og Faroe Seafood, og hesar hendingar hava uttan iva havt negativa stutttíðar ávirkan á væntanir hjá húsarhaldum og fyritøkum. Húsarhaldsnýtslan kom niður á eitt sera lágt stig í 2010 aftaná búskaparligu niðurgongdina í 2008 og 2009. Mett verður, at húsarhaldsnýtslan dróg

niður í vøkstrinum í 2010. Ábendingar eru tó um, m.a. í mvg-hagtølum, at húsarhaldini vóru við at venda gongdini til aftur at brúka ein heldur størri part av inntøkuni til nýtslu. Sambært mvg-hagtølum eru ábendingar um, at nýtslan hevur hildið sær á hesum lága stigi fyrra hálvár 2011. Húsarhaldini eru ikki illa fyri í altjóða sammeting og seinasta treystikanningin bendir á, at húsarhaldini hava heldur frægari vónir um útlitini. Tí er væntandi, at tey fara at vaksa partin av inntøkuni, sum fer til nýtslu. Tað er tikið við í viðtøkurnar fyri framrokning av BTÚ í 2011 og 2012.

Tað at ein so stórur banki sum Eik Banki fór á húsagang og undir umskipan, kundi hugsast at fáa stórar avleiðingar fyri útlánsvirksemið í Føroyum við møguligari kredittklemmu, har góðar vinningsgevandi íløgur ikki fingu fígging. Mett verður tó, at manglandi eftirspurningur eftir fígging til nýtslu og íløgur í størstan mun hevur virkað avmarkandi fyri útlánsvirksemið hjá bankunum, hóast varnari útlánspolitikkur helst eisini hevur verið galdandi.

Fíggjarstøðan hjá bankunum er framvegis merkt av, at bankarnir vuksu lántøkuna nógv á evropeiskum lánsmarknaðum árini 2004-2007, og av at teir hava virkað undir ríkistrygd síðan altjóða fíggjarkreppuna í 2008. Ríkistrygdin var fyrst generel, men er síðan gjørd individuel, har peningastovnar eftir umsókn hava fingið játtað hybridkapital og ríkisveðhald, sum teir rinda fyri. Eik Banki hevur harumframt fingið nýggjan kapital, eins og vánaligir partar av bankans virksemi vórðu yvirtiknir av Finansiel Stabilitet.

Í seinastuni er komið fram, at ein fjórði bankapakki verður umhugsaður í danska ríkinum, sum bankarnir tó sjálvir skulu fíggja. Útlit eru tí til eina meira líðandi yvirgongd aftaná seinnu helvt í 2013, har bankarnir skulu væntast at klára seg við egnari megi. Tað er neyvan sannlíkt, at bankarnir kunnu troyta somu lánsmarknaðir í sama mun sum undan altjóða fíggjarkreppuni, tá almenni stuðulin fjarðar út. Tí er tað væl møguligt, at útlán frá bankum verða avmarkandi fyri vøkstur, so hvørt sum ynski um størri nýtslu og íløgur fara at vísa seg hjá húsarhaldum og fyritøkum. Mett verður tó ikki, at viljin ella førleikin til at læna út verður ein álvarslig forðing í 2011 og kanska heldur ikki í 2012.

Nýggir eigarar eru til virkir og skip, sum vóru í Faroe Seafood samtakinum, sum var í trotabúsviðgerð. Bert ein partur av framleiðslukapasitetinum er vorðin virkin aftur fyribils. Eftir hesa endurskipan eru útlit til, at kapasiteturin til virking av botnfiski fer at hóska væl betur til rávørunøgdirnar, og tí kunnu fiskavirkini vænta ein betri rakstur eins og betri kappingarføri til at keypa fisk. Um so verður, kunnu vit vænta ein produktivitetsvøkstur komandi árini á hesum øki.

Sambært forward-prísir varð tíðliga í ár væntað í marknaðinum, at Brent olja fer at kosta millum 90 og 110 USD pr. tunnu fram til 2012. Higartil í 2011 hevur oljuprísurin ligið nærri 120 USD pr. tunnu, uttan í seinastuni, har hann hevur verið undir 110 USD vegna ivasomu útlitini í framkomnu londunum. Orkukostnaður má tí væntast at draga niður í búskaparvøksturin komandi 2 árini. Havstovan metir upsastovnin at vera hampuliga væl fyri, men veiðan er minkað heilt nógv í 2011. Hugsandi er, at samband er her við húsagangin í Faroe Seafood samtakinum og við høgu oljuprísirnar.

Eingin avtala er í 2011 millum strandalondini um makrelfiskiskapin, tí at londini áseta egnar kvotur. Ein avleiðing er, at veiðuavtalur ikki eru endurnýggjaðar við Noreg og ES, sum ger at nakrir skipabólkar fáa verri veiðirættindi, meðan makrelfiskiskapurin verður í

føroyskum sjógvi. Eisini kunnu væntast havnastongslar fyri landing av makreli í Noregi og ES-londum. Royndirnar frá 2010 og 2011 vísa tó, at avleiðingarnar av hesum vóru ikki so ógvusligar, tí at alternativir sølumøguleikar finnast, tó at ynskiligt er at fáa strandalandasamstarvið í rættlag aftur.

Búskaparvøkstur í fleiri menningarlondum hevur við sær, at ein skjótt vaksandi fjøld av brúkarum fara at eftirspyrja dygdargóðar fiskavørur. Marknaðarútlitini fyri føroyska fiskivinnu eru tí yvirhøvur góð. Teirra stóri búskaparvøkstur ger, at menningarlondini eru ein vaksandi partur av heimsbúskapinum. Tey hava tí vaksandi týdning fyri, hvat hendir við t.d. matvøruprísum, rávøruprísum og ikki minst orkuprísum.

Samanumtikið eru útlit til, at búskapurin fer at vaksa í 2011 og 2012. Tað, at húsarhaldini verða trygg við at hækka nýtsluna nakað, hevur við sær, at avgjaldsinntøkur hjá landinum kunnu vaksa skjótari enn BTÚ. Konjunkturgongdin fer tí at minka nakað um landskassahallið. Harumframt kann hallið minkast við átøkum sambært gjørdum ætlanum uttan at taka burtur allan búskaparvøksturin. Hetta er ynskiligt fyri at almenna skuldin framvegis verður á einum hóskiligum stigi, sum ger, at Føroyar tola sveiggj í búskapinum uttan at missa álit frá egnum borgarum og lánveitarum.

Ein betri stýring av fiskivinnuni kann fáa týdning fyri betri rakstri í fiskivinnuni og fyri búskaparvøkstri frameftir. Tað er tí gott, at politiskar ætlanir eru til at gera nakað við stýringina, m.a. at stilla fiskidagarnar og ætlanina at fylgja vísindaligum ráðum um stýringina. Spennandi og týðandi verður eisini at vita, hvør læra kann gerast av royndarskipanini í 2011 fyri útluting av makrelveiðirættindum.

## 3.2 BÚSKAPARLIG ÚTLIT

### 3.2.1 Seinasta konjunkturgongdin

Eftir at lønargjaldingar hava – roknað sum rullandi árligur summur – verið í minking í tíðarskeiðnum apríl 2009 til august í fjør, hava tær seinasta árið verið vaksandi. Árliga minkingin í lønarútgjaldingum var 4,5% í januar í fjør, og seinastu hagtølini frá juni í ár vísa árligan vøkstur á 1,4%. Gongdin í lønargjaldingum er tó ikki eins innan ymsu vinnubólkarnar.

Árlig %-broyting í lønarútgjaldingum, 12 mðr summur, jan-05 til jul-11 MYND 3.1




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Fiskaaling er tann vinnan við lutfalsliga størsta lønarvøkstrinum (27% í juni), og í fiskiveiði hevur lønarvøkstur verið síðan juli í fjør. Hóast seinastu tølini vísa fallandi vøkstur, er hesin framhaldandi lutfalsliga stórur (15% í juni). Lønarútgjaldingar eru minkaðar serliga nógv innan bygging og privatar tænastuvinnur, síðan afturgongdin í búskapinum byrjaði á heysti 2008. Handils- og tænastuvinnur hava framvegis árliga minking, men innan bygging vísa hagtølini vøkstur á 3%.

Arbeiðsloysið í % av arbeiðsfjøld, 1. kvt. 1998 til 2. kvt. 2011 — MYND 3.2




**Kelda:** Hagstova Føroya og OECD.

Arbeiðsloysið var vaksandi gjøgnum alt 2009 og fyrstu mánaðirnar av 2010. Í mai 2010 minkaði arbeiðsloysið fyri fyrstu ferð síðan november 2008 og var tá 5,8%. Orsakað húsaganginum í Faroe Seafood hækkaði arbeiðsloysið við árslok 2010 til 6,9%. Partur av fólkunum, ið mistu arbeiði hjá Faroe Seafood, eru aftur arbeiðsvirkin. Arbeiðsloysið hevur verið omanfyri 7% fyrr á árinum, men er síðan fallið nakað, og saman við generellu uppgongdini í búskapinum verður sostatt roknað við, at gongdin við minkandi arbeiðsloysi heldur á fram í 2011 og 2012.

### 3.2.2 Framrokning av BTÚ

Í seinastu búskaparmeting hjá Landsbankanum frá februar varð BTÚ framroknað fyri árini 2010 til 2012. Framrokningin av BTÚ bygdi sostatt á uppgerðir hjá Hagstovuni til og við 2009. Síðan er Hagstovan komin við bráðfeingisuppgerð av BTÚ fyri 2010 og bráðfeingisuppgerðin fyri 2009 í februar er harumframt endurskoðað og hækkað við 319 mió.kr. Bráðfeingisuppgerðin av BTÚ hjá Hagstovuni fyri 2010 vísir nominellan vøkstur á 3,4% í mun til 2009.

Framrokningar av BTÚ og lønum fyri 2011 og 2012 — MYND 3.3




**Kelda:** Landsbanki Føroya, meting t. 15. august 2011.

Grundarlagið fyri framrokningini hesaferð fyri 2011 og 2012 er tískil broytt og betrað. Ein týðandi fyritreyt fyri framrokningini av 2011 er gongdin í lønarútgjaldingunum, umframt gongdin í út- og innflutningi, og mett verður um almenna og privata eftirspurningin.

Fyri 2011 er vøksturin framroknaður til 3,1%. Miðal árligi prísvøksturin við 2. ársfjórðing var 1,6%, og roknað verður við enn størri vøkstri við endan av 2011. Hetta merkir, at føroyski búskapurin bæði í 2010 og 2011 er í vøkstri eftir reala afturgongd í 2008 og 2009. Samanlagt eru sostatt framvegis tekin um, at afturgongdin í føroyska búskapinum, ið byrjaði í 2008 og vardi við í 2009, vendi til lítla framgongd í fjør, og at vøksturin heldur áfram í ár og í 2012.

Eftir lutfalsliga stóra afturgongd í privatu nýtsluni árini 2008-2010, verður mett, at privata nýtslan er vaksandi, hóast lyklatøl, m.a. lutfallið millum mvg-inntøkur og lønarútgjaldingar, benda á, at privata nýtslan framvegis er lutfalsliga lág. Metingar hjá húsarhaldunum, smb. seinastu treystitalsuppgerðini um fíggjarligu útlitini næsta árið, vísa samstundis størri bjartskygni í mun til kanningar seinastu 4 árini.

Bruttotjóðarúrtøka í Føroyum 1998 til 2012, ársins prísir MYND 3.4




**Kelda**: Hagstova Føroya (2003-2010) og Landsbanki Føroya (metingar fyri 2011 og 2012 t. 15. august 2011).

Sambært almennum roknskapum hjá landi og kommunum vaks almenna nýtslan samanlagt uml. 2% í 2010, og fyri 2011 og 2012 er almenna nýtslan ásett av vaksa 1% árliga.

Atgongd til fígging, rentulegan og búskaparútlitini eru avgerandi fyri hugin hjá privatum fyritøkum at gera íløgur. Mett verður at privatu íløgurnar í 2011, eins og í 2010, eru fallandi í mun til árið undan og aftur vaksandi í 2012. Samlaðu almennu íløgurnar eru mettar at hava verið minkandi árini 2008 til 2010, men aftur vaksandi í 2011 og 2012 í mun til 2010.

Samlaði útflutningurin av vørum og tænastum minkaði uml. 6% í 2009, men vaks 12% í 2010. Væntað verður, at samlaði útflutningurin av vørum og tænastum veksur umleið 7% í 2011 og uml. 4% í 2012.

Mett verður, at goymslurnar minkaðu heilt fitt árini 2008, 2009 og 2010. Hetta hongur væntuliga saman við, at stórur partur av privata vinnulívinum hevði hall í 2009 og ávísar trupulleikar við rakstrinum í 2010. Fyritøkurnar hava tí tillagað sítt virksemi í 2009 og 2010, og ein partur av hesum tillagingum hevur verið at minka goymslurnar.

Rakstrartrupulleikarnir og partar av tillagingunum hava drigið búskaparvøksturin niður í 2010, sum teir eisini hava gjørt í 2009.

Ískoyti í prosentum hjá endaligari nýtslu til broytingar í BTÚ — TALVA 3.1

| *Árlig nominel %-broyting* | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **BTÚ** | **-2,2** | **3,0** | **2,9** | **12,9** | **5,9** | **-0,8** | **-1,7** | **3,3** | **3,1** | **3,5** |
| Privat nýtsla | 2,1 | 4,4 | 5,2 | 5,7 | 1,4 | -0,4 | -0,5 | -1,5 | 0,7 | 2,2 |
| Almenn nýtsla | 1,5 | 1,8 | 1,5 | 1,1 | 2,1 | 3,0 | 0,6 | 0,7 | 0,3 | 0,3 |
| Privatar íløgur og goymslubr. | 6,6 | -13,8 | 6,4 | 3,5 | 8,3 | -11,8 | 0,0 | 1,6 | 0,1 | 1,0 |
| Almennar íløgur | 0,2 | 1,5 | -0,8 | 1,4 | 1,2 | 0,9 | -3,2 | -0,6 | 0,3 | 0,3 |
| Nettoútflutningur | -12,5 | 9,1 | -9,4 | 1,1 | -7,2 | 7,5 | 1,4 | 3,2 | 1,7 | -0,3 |

**Kelda:** Hagstova Føroya (2003-2009 og BTÚ fyri 2010) og Landsbanki Føroya (meting av útreiðslubýti av BTÚ í 2010, umframt framrokning av 2011 og 2012).

Um privatu fyritøkurnar hava framt neyðugar tillagingar av rakstrinum í 2009 og 2010, skuldu tær fingið ein betri rakstur í 2011. Út frá hesum sjónarmiði verða goymslurnar ikki broyttar so nógv í myndlinum fyri 2011 og 2012. Hesar báðar viðtøkur um betri rakstur og goymsluíløgur geva positivt ískoyti til vøksturin í 2011 og 2012.

Í talvu 1 sæst, í hvussu stóran mun ymsu partarnir av endaligu nýtsluni hava ávirkað BTÚ seinnu árini, umframt hvørja ávirkan ásetingarnar av fyritreytum hava á BTÚ-framrokningina fyri árini 2011 og 2012.

### 3.2.3 Altjóða búskaparútlit

Í løtuni valdar rættuliga stórur ótryggleiki á heimsins fíggjarmarknaðum, har bæði partabrævamarknaðir, lánsbrævamarknaðir og rávørumarknaðir sveiggja nógv. Fleiri viðurskifti eru, ið hava lopið fjáltur á íleggjarar.

Støðan í USA, har semja í evstu løtu fekst um at hækka skuldarloftið hjá sambandsstjórnini, hevur minkað um álitið á politisku skipanina. Íleggjarar ivast í, um politisk semja fæst um, hvussu lutfalsliga stóra hallið á amerikonsku fíggjarlógini skal minkast. Gjógvin millum tey, ið bert vilja minka um hallið við at minkað um almennu útreiðslurnar, og tey, sum eisini vilja hækka skattir, er sera stór. Eitt úrslit av hesum er, at Standard & Poor´s, ein av stóru ratingfyritøkunum, hevur niður-ratað USA, soleiðis at landið ikki longur hevur hægstu ratingina AAA. Hartil eru útlit til, at ratingin kann minka enn meira, um ikki haldgóð loysn fæst á fíggjartrupulleikunum í USA.

Vandin fyri, at amerikanski búskapurin aftur verður fyri niðurgongd er vaksin í seinastuni. Neyvan slepst undan stórum sparingum í almenna geiranum, og minkar hetta um samlaða eftirspurningin í búskapinum. Um húsarhaldini ikki vaksa nýtsluna er sannlíkt, at vøksturin í amerikanska búskapinum verður lutfalsliga lítil komandi tíðarskeiðið, og ávirkar hetta m.a. partabrævamarknaðin skeiva vegin.

Í Evropa dragast fleiri lond við stóra skuld. Grikkaland, Írland og Portugal eru øll bjargað frá at fara á húsagang, Grikkaland enntá tvær reisur. Nú er spenningur um Italia og Spania megna at røkja skyldur sínar. ES-londini settu í 2010 á stovn eitt felag, EFSF,[27] ið kann veita lán til sperdu limalondini. Samtykt varð, at EFSF kann veita 440 mia. evrur í láni, sum ES-londini veita trygd fyri, til lond, ið eru komin í trupulleikar. Men koma Italia

[27] European Financial Stability Facility.

og Spania í trupulleikar, verður óivað neyðugt at økja munandi um upphæddirnar, sum EFSF kann læna út. Stór ósemja er í Týsklandi, um tað er rætt at økja hesa upphædd, og lánsbrævamarknaðir í Evropa hava verið nógv merktir av hesum. Í eini roynd at taka broddin av álvarsomu støðuni hevur ECB keypt upp stórar nøgdir av italskum og sponskum lánsbrøvum og sýnist hetta at hava stabiliserað marknaðin nakað. Men tryggleiki fer neyvan at valda á evropeisku lánsbrævamarknaðunum aftur, fyrr enn haldgóðar loysnir eru funnar fyri búskapirnar í sperdu evropeisku londunum. Hesar loysnir snúgva seg í stóran mun um at loysa bygnaðarligu trupulleikarnar, sum eyðkenna búskapirnar, og krevur hetta stórt politiskt dirvi. Álvarsliga støðan í Evropa bleiv staðfest, nú fregnast verður í fjølmiðlum, hvørt Frankaríki er komið undir sjóneykuna hjá ratingfyritøkunum og møguliga stendur fyri einari niðurrating. Samanumtikið ery útlitini fyri heimsbúskapin heldur verri, enn tey vóru fyri hálvum ári síðani.

Árligur realur BTÚ-vøkstur í %, 2009-2012 — TALVA 3.2

| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|
| Heimsbúskapurin | -0,5 | 5,1 | 4,3 | 4,5 |
| USA | -2,6 | 2,8 | 2,5 | 2,6 |
| Týskland | -4,7 | 3,5 | 3,2 | 2,0 |
| Stóra Bretland | -4,9 | 1,3 | 1,5 | 2,3 |
| ES-londini | -4,1 | 1,8 | 2,0 | 1,7 |

**Kelda:** IMF World Economic Outlook Update, 17. juni 2011

## 3.3 GEIRARNIR Í BÚSKAPINUM

Her verður í stuttum tikið saman um geirarnar í búskapinum, ið verða hildnir at vera týðandi fyri gongdina í búskapinum og útlitini frameftir.

### 3.3.1 Tað almenna

#### *3.3.1.1 Landið*

Lutfalsliga stór landskassahall hava verið árini 2008-2010 og væntandi verður hall á fíggjarlógini fleir ár afturat. Hallið í Landskassanum hevur hildið búskaparliga virkseminum og generella eftirspurninginum á einum hægri støði enn, um t.d. javnvág var á landsins fíggjarlóg.

Landskassahall seinnu árini hava økt landskassaskuldina munandi. Seinastu 2 árini er skuldin vaksin við 1,3 mia. kr. og var bruttoskuldin við árslok 2010 uml. 4,9 mia. kr. Við útbúnaði hevur landskassin tó framvegis eina nettoogn á uml. 450 mió. kr. Væntandi kemur landskassin at hava nettoskuld á uml. 100 mió. kr. við árslok 2011.

Samlaðu rakstrarútreiðslur landskassans vóru 5.518 mió. kr. í 2009, 5.686 mió. kr. í 2010 og verða sambært fíggjarlógini fyri 2011, 5.753 mió. kr. Eitt ávíst trýst uppeftir verður á rakstrarútreiðslurnar í 2012 og árini frameftir, við tað at millum 130 og 140 nýggj røktarheimspláss gerast tøk. Møguligar lønarhækkingar kunnu eisini tyngja um raksturin. Í 2012 eru rakstrarútreiðslurnar mettar at hækka við 1%.

Landskassaíløgurnar eru minkaðar árini 2008, 2009 og 2010, men vaksa smb. fíggjarlógini fyri 2011 við uml. 70 mió. kr. til umleið 230 mió. kr.

Veitingarnar vera væntandi á leið tær somu í 2011 og 2012, sum tær vóru í 2010.

Landskassahallið var 688 mió. kr. í 2009 og 567 mió. kr. í 2010, og smb. fíggjarlóg fyri 2011 verður hallið uml. 500 mió. kr. Sostatt heldur landið búskaparliga virkseminum og generella eftirspurninginum uppi við stóra hallinum, men táttar í 2011 við at minka hallið. Landsstýrið og løgtingið hava sum mál, at avlop skal verða á fíggjarlógini í 2016.

#### *3.3.1.2 Kommunurnar*

Síðan niðurgongdin í føroyska búskapinum byrjaði í 2008, hava flestu kommunurnar minkað um íløgurnar og fleiri teirra eisini um rakstrarútreiðslurnar. Søguliga sæð virka kommunurnar konjukturviðgangandi, og gjøgnum seinastu kreppuna er hetta fyribrigdið enn einaferð staðfest.

Kommunurnar høvdu samlað sæð eitt RLÚ-úrslit á umleið 34 mió. kr. í 2010, eftir at hava havt hall á góðar 168 mió. kr. í 2009. Stóra betranin í úrslitinum í 2010 í mun til 2009 kemst sum heild av hægri skattainntøkum hjá kommununum. Fíggjarætlanir hjá kommununum fyri 2011 benda á eitt hall á umleið 54 mió. kr, og eru lækkandi skattainntøkur høvuðsorsøkin til hetta. Samlaðu kommunalu íløgurnar lækkaðu 14% frá 2009 til 2010, og fyri 2011 koma tær sannlíkt at liggja á sama støði sum í 2010, t.v.s., umleið 240 mió. kr.

Torført er at meta um kommunala geiran í 2012, tí ongar fíggjarætlanir enn eru gjørdar, men ikki er ósannlíkt, at støðan fer at minna um 2011, bæði viðvíkjandi inntøkum, rakstri og íløgum.

Tórshavnar kommuna er nógv tann størsta kommunan, og hon er væl fyri fíggjarliga og skal eftir ætlan fremja íløgur fyri 132 mió. kr. í 2011 í m.a. ellisheim. Hetta virkar stimbrandi á búskapin.

### *3.3.1.3 Sosialu grunnarnir*

Arbeiðsloysisskipanin virkar útjavnandi í konjunkturgongdini og stimbrar virksemið nú framleiðslan er undir vanligum stigi. ALS hevur í løtuni eina eginogn á uml. 550 mió. kr., og við verandi arbeiðsloysi verða útgoldnar uml. 20 mió. kr. í arbeiðsloysisstuðli um mánaðin. Við væntandi minni arbeiðsloysi gjøgnum árið, kann samlaða útgjaldið í 2011 tátta í 250 mió. kr. Inngjaldið er uml. 140 mió. kr. árliga, men skipanin er fíggjarliga væl fyri og ment at standa ímóti fleiri árum við lutfalsliga høgum arbeiðsloysi. Vøksturin í útgjøldum styrkir um keypsorkuna hjá arbeiðsleysum, minkar um óttan fyri at gerast arbeiðsleysur og fær væntandi ta ávirkan, at húsarhaldini vaksa minni um uppsparingina, enn tey annars høvdu gjørt.

AMEG sparir upp til eitt vaksandi tal av eldri, meðan Barsilsskipan og Heilsutrygd gjalda nøkulunda tað sama út, sum kemur inn og ávirka tí ikki samlaða búskapin í sama mun sum ALS.

### 3.3.2 Húsarhaldini

Føroysk húsarhald eru sum heild ikki illa fyri sammett við húsarhald í flestu øðrum londum. Lán við veð í sethúsum hjá húsarhaldum í Føroyum eru um 75% av BTÚ, sum er tætt við miðal í altjóða sammeting. Húsarhald í Danmark, Sveis, Stórabretlandi og USA hava lántøku á millum 90 og 120% av BTÚ. Lántøkan hjá húsarhaldum í Italia, Fraklandi, Týsklandi og Japan er hinvegin nakað lægri millum 40 og 60% av BTÚ.

Virðisbroytingar síðan januar 2007 MYND 3.5




**Kelda:** Landsbanki Føroya, Eik Banki og VP.

Smb. lutfallinum mvg/lønir, sí mynd 3.6, hava húsarhaldini minkað lutfalsliga nógv um nýtsluna frá heystinum 2007 til várið 2010, men seinastu hagtølini benda á, at nýtslulutfallið hevur stabiliserað seg á einum lágum stigi. Møguleiki er sostatt fyri at húsarhaldini aftur fara at vaksa nýtsluna, tá framtíðarvónirnar gerast betri. Innflutningstølini fyri drúgvar og hálvdrúgvar vørur benda á, at fyritøkur aftur vaksa um goymslurnar.

Gongd í lønum og MVG, jan-98 til jul-11 MYND 3.6




**Kelda:** Hagstova Føroya og TAKS.

Seinasta treystikanningin av føroyskum húsarhaldum vísir, at húsarhaldini í juni hava heldur betri vónir til persónligu fíggjarligu viðurskiftini og generellu búskaparstøðuna næstu 12 mánaðirnar sammett við fyri hálvum ári síðan.

### 3.3.3 Tilfeingisvinnurnar

Til ber at býta tilfeingisvinnurnar í fýra bólkar, ið virka undir ymsum fyritreytum til ymsar tíðir. Tilfeingisvinnurnar kunnu verða býttar í botnfiskiveiði undir Føroyum, botnfiskiveiði á fjarleiðum, fiskiveiði eftir uppsjóvarfiski og alivinnu.

#### *3.3.3.1 Botnfiskiveiði undir Føroyum*

Fyrstu sjey mánaðirnar í ár eru nøgdirnar av avreiddum botnfiski 27% lægri sammett við sama tíðarskeið 2010. Ein orsøk er, at skip lógu meginpartin av januar mánaði vegna verkbann, og ein onnur orsøk er óivað húsagangurin í Faroe Seafood. Tað eru serliga nøgdirnar av upsa og hýsu, sum eru minkaðar, meðan nøgdirnar av toski eru vaksnar góð 5%. Prísirnir hava verið hægri fyrra hálvár í ár sammett við 2010, so samanlagt er avreiðingarvirðið á botnfiski minkað 11%.

Indikatorar fyri føroyska feskfiskiveiði, jan-03 til jul-11 MYND 3.7




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Heildarveiðan eftir botnfiski undir Føroyum er framvegis lítil sammett við søgulig tøl. Í 2010 vórðu avreidd umleið 14 tús. tons av toski sammett við eina miðalveiði á uml. 23 tús. tons síðani 1961. Avreiðingar av hýsu vóru uml. 5 tús. tons í 2010 sammett við eina miðalveiði á uml. 17 tús. tons síðani 1957. Av upsa vórðu avreidd uml. 40 tús. tons í 2010, sum er tætt við miðalveiðina síðani 1961. Fyrra hálvár í ár eru, sum nevnt omanfyri,

nøgdirnar av upsa og hýsu minkaðar munandi sammett við 2010 (millum 30 og 40%). Samanlagt verða avreiddu nøgdirnar av botnfiski tí neyvan hægri í 2011, enn tær vóru í 2010.

Oljuprísir eru framvegis høgir, og hava verið hækkandi í 2011. Hetta ávirkar raksturin hjá fleiri skipabólkum. Nógv minkandi framleiðslan í heimaflotanum síðstu árini stavar fyrst og fremst frá, at fiskastovnar hava verið ov hart troyttir undanfarin ár, samstundis sum gróðrarlíkindi undir Føroyum og tilgongd hava verið undir miðal. Toska- og hýsustovnurin eru framvegis illa fyri og smáir, og gýtingarstovnarnir eru søguliga smáir. Sambært fiskifrøðingum eru útlit til betri fiskiskap eftir toski næstu árini, m.a. tí at nakrir hampiliga góðir árgangir eru ávegis í stovnarnar. Fyri veiðina eftir hýsu eru útlitini framvegis ikki góð.

*3.3.3.2 Botnfiskiveiði á fjarleiðum*

Eingin fiskiskapur er hjá føroyskum skipum í norska partinum av Barentshavinum í ár. Vinnan sjálv metir, at hetta kann minka veiðivirðið uml. 30%. Føroysku kvoturnar í russiskum sjógvi verða tær somu í 2011 sum í 2010. Harafturat verða kvoturnar av toski á Flemish Cap tvífaldaðar, soleiðis at føroyska kvotan av toski har er 2.200 tons í 2011.

Royndin eftir toski og hýsu í Barentshavinum er sambært ICES á burðardyggum stigi, og útlitini fyri henda fiskiskapin eru støðug frameftir. Framleiðslan tilsamans í hesum partinum av flotanum verður mest sannlíkt nakað minni komandi tvey árini, men kann síðani koma á umleið sama stig aftur við tí fyrivarni, at samstarvið millum strandalondini um fiskivinnuavtalur kemur í rættlag aftur.

*3.3.3.3 Uppsjóvarvinna*

Uppsjóvarskipini ávirkast av ósemjuni millum strandalondini um makrelfiskiskapin og í øðrum lagi av, at heildarkvotan av svartkjafti er minkað 93% og heildarkvotan av norðhavssild minkar 33% í 2011. Føroyska svartkjaftakvotan verður uml. 10 tús. tons, meðan kvotan av norðhavssild verður uml. 51 tús. tons.

Makrelfiskiskapurin í føroyskum sjógvi, og føroyska kvotan eftir lodnu í tvílandaavtaluni millum Ísland og Føroyar gera, at veiðivirðið tilsamans ikki ávirkast so nógv. Harafturat kemur, at ein størri partur av veiðini kann verða avreiddur til matna, og prísirnir verða tí í miðal helst hækkandi.

Samanumtikið er væntandi, at framleiðslan í hesum partinum av flotanum verður nakað lægri í 2011 sammett við undanfarin ár. Harafturat kemur, at fiskiskapurin eftir makreli í føroyskum sjógvi um summarið enn kann sigast at vera á royndarstigi. Óvissa er um, hvussu stór virði fáast úr fiskiskapinum, m.a. orsakað av hjáveiði av øðrum fiskasløgum o.tíl. Eisini er óvissa um, hvussu strandalondini fara at umsita makrelfiskiskapin næstu árini.

*3.3.3.4 Alivinna*

Útlitini fyri hægri framleiðslu næstu árini í alivinnuni eru góð. Tøkan verður av vinnuni mett til umleið 60 tús. tons í 2011, meðan hon var góð 47 tús. tons í 2010. Útsetingin næstu 2-3 árini verður meiri sammett við undanfarin ár, so tøkan fer væntandi at verða umleið 60-70 tús. tons næstu 2-3 árini. Prísirnir hava verið høgir leingi, men eru falnir

nakað miðskeiðis í 2011. Fallið er tó úr einum høgum stigi, soleiðis at prísirnir framvegis eru høgir. Útflutningsvirðið á alifiski var umleið 1,4 mia. kr. í 2010, og tað kann gerast 1,7 mia. kr. í 2011 við verandi prísum.

Indikatorar fyri alivinnuna, jan-03 til jul-11 MYND 3.8




**Kelda:** Hagstova Føroya.

#### *3.3.3.5 Samanumtikið um tilfeingisvinnurnar*

Samanumtikið eru tekin um, at framleiðslan helst verður á áleið sama stigi í 2011 sum í 2010, men næstu árini eru útlit til hækkandi framleiðslu. Óvissur eru knýttar at hesum. M.a. kann oljuprísurin vaksa meira enn væntað, og óvist er, hvussu makrelfiskiskapurin verður umsitin av strandalondunum næstu árini. Við nevndu fyrivarnum er mest sannlíkt, at tilfeingisvinnurnar hava ískoyti til vøkstur í BTÚ við sær í 2011. Næstu árini eru kortini útlit til vaksandi framleiðslu, um botnfiskastovnarnir vaksa aftur, og fiskiskapurin aftur batnar.

### 3.3.4 Fíggjargeirin

Føroyski fíggjargeirin tykist hava fótað sær eftir at Eik-samtakið fór á húsagang á heysti 2010. Stoyturin sum komst av Eik-húsaganginum hevur tíbetur fyri mesta partin havt stutttíðarárin á føroyska búskapin, tó at onkur langtíðarárin óivað fara at merkjast frameftir.

Húsagangurin og leisturin, sum Finansiel Stabilitet arbeiddi eftir í tíðarskeiðinum at fáa selt bankan á aðrar hendur, legði ávísar avmarkingar á útlánsvirksemi bankans. Húsarhald og vinnulív við tørvi á fígging vóru noydd at sláa seg til tols ella leita sær fígging í øðrum føroyskum peningastovnum.

Hagtøl fyri inn- og útlánsvirksemið vísa, at húsarhald og vinnulív í fíggjarkreppuni hava minkað nýtsluna lutfalsliga og økt uppsparingina, og mett verður, at órógvið eftir húsagangin hevur avmarkað ein frammanundan lutfalsliga lítlan eftirspurning eftir fígging. Húsagangurin kom sostatt í eini tíð, har eftirspurningurin eftir fígging var avmarkaður, og mett verður, at beinleiðis negativa ávirkanin á búskaparliga virksemið av hesum ávum hevur verið avmarkað.

Eitt langtíðarárin ið møguliga kann standast av Eik-húsaganginum og darva vøkstri frameftir er minni hugur hjá føroyingum at gera íløgur í partabrøv. Sannlíkt er eisini, at bankar frameftir fara at aftra seg við at fíggja stórar verkætlanir einsamallir.

Eitt vælvirkandi fígggjarkervi er til reiðar at fíggja verkætlanir, ið sannlíkt kasta vinning av sær við tíðini. Um fígging ikki verður givin til slíkar verkætlanir verður tosað um eina kreditklemmu. Mett verður ikki, at nøkur kredit-klemma eyðkennir føroyska fíggjargeiran í løtuni. Hinvegin er eftirspurningurin eftir fígging lutfalsliga lítil, og hetta tálmar útlánsvirkseminum hjá bankunum nakað.

Eftirspurningurin eftir fígging er eisini nær tengdur at framtíðar útlitum. Um fyritøkur og húsarhald stúra fyri framtíðini og vænta lágan vøkstur og høgt arbeiðsloysi, tálmar hetta eftirspurninginum eftir fígging.

### 3.3.5 Aðrar vinnur

Hetta eru framleiðslu- og tænastuvinnur, sum ikki eru nevndar omanfyri, men sum til samans eru stórur partur av virðisøkingini í føroyska búskapinum.

#### *3.3.5.1 Fiskavirking*

Stórar broytingar hava seinastu tíðina verið at sæð í fiskavirkisvinnuni, og í sambandi við viðgerðina av búnum eftir Faroe Seafood er fiskavirkisvinnan eisini umskipað. Bert fá av virkjunum í gamla Faroe Seafood samtakinum eru latin upp aftur eftir húsagangin. Verður framleiðslukapasiteturin lagaður betri til tað rávørugrundarlag, sum er undir Føroyum, eru útlit til, at henda vinnan kann gerast meira lønandi frameftir.

Framleiðslan í 2011 verður helst nakað minni enn í 2010 og talið av løntakarum er minkað rættuliga fitt. Somuleiðis eru útgoldnar lønir lægri enn tær vóru fyri ári síðani. Mynd 3.9 vísir, at síðandi 2003 er arbeiðsmegin í flakavinnuni minkað við meira enn einum helmingi.

Indikatorar fyri fiskavirkisvinnuna, jan-03 til jul-11 MYND 3.9




**Kelda:** Hagstova Føroya.

#### *3.3.5.2 Byggivinnan*

Virksemið í byggivinnuni er minkað nógv seinastu 2-3 árini, men tað tykist sum byggivinnan er um at fóta sær aftur. Vanligt húsasmíð er minkað nógv, og hetta ávirkar virksemið hjá serliga smærri fyritøkum innan húsasmíð, men tað eru framvegis fleiri verkætlanir í gongd, m.a. bygging av raðhúsum og íbúðum umframt almennar verkætlanir í miðstaðarøkinum og aðrastaðni.

Stórar og miðalstórar fyritøkur í byggivinnuni hava sum heild nóg mikið av arbeiði í øllum førum eitt ár ella hálvtannað árið frameftir. Vónirnar í vinnuni eru nakað tær somu sum við

seinastu meting, og broyttu fyritreytirnar gera framvegis sína ávirkan galdandi frá støðuni fyri fáum árum síðan. Minkingin í virkseminum í byggivinnuni sæst greidliga aftur í, at lønargjaldingarnar tilsamans eru minkaðar umleið 24% síðani á sumri 2008, og talið á løntakarum er minkað umleið 28%, sí mynd 3.10.

Indikatorar fyri byggivinnuna, jan-03 til jul-11 MYND 3.10




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Fleiri almennar verkætlanir og arbeiði eru fráboðað, sum eru byrjað, meðan onnur arbeiði byrja seinni í 2011 og í 2012. Av størri verkætlanum kunnu nevnast at leingja flogvøllin, miðnámsskúli í Marknagili, útbyggingar av vatnorku hjá SEV og Leirvíkarvegurin.

Harafturat hevur Tórshavnar kommuna ætlanir um at fara undir fleiri verkætlanir, harav nakrar eru byrjaðar, umframt at Landsverk ætlandi fer undir nakrar smærri vegagerðir. Effektiviteturin í byggivinnuni kann vaksa næstu árini, verða byggifyritøkur størri og hava neyðuga umsitingarførleikan. Væntandi verða eisini størri eindir at síggja í byggivinnuni. Serliga tá hugsað verður um, at kappingin frá útlendskum byggifyritøkum harðnar.

### *3.3.5.3 Handils- og tænastuvinnurnar*

Privata nýtslan og eftirspurningurin eftir vørum og tænastum eru framvegis lág sammett við søgulig tøl. Hetta ávirkar handils- og tænastuvinnur. Tað er serliga sølan av drúgvum nýtsluvørum og ymsum tænastuveitingum, sum er minkað nógv, meðan sølan av ódrúgvum nýtsluvørum ikki er minkað líka nógv. Tó benda seinastu innflutningstølini á, at innflutningurin av drúgvum nýtsluvørum er vaksin nakað aftur, og hetta er helst tekin um, at fyritøkur aftur vaksa goymslur sínar.

Indikatorar fyri handil og tænastuvinnur, jan-03 til jul-11 MYND 3.11




**Kelda:** Hagstova Føroya.

At døma eftir MVG-tølunum er privata nýtslan við at stabilerisera seg aftur, men tó á eina legu, sum er væl lægri enn miðallegan, sum hevur verið síðstu nógvu árini. Tekin eru um, at goymslurnar fara ikki at minka meira, og íløgurnar kunnu hugsast at fara at vaksa nakað. Eftir konjunkturbarometrinum at døma eru vánirnar bjartari enn áður. Hetta stuðlar upp undir heildarmetingina, at búskapurin hevur møguleika at vaksa í nøkur ár.

Í handilsvinnuni er bygnaðurin broyttur seinastu árini. Alsamt fleiri matvøruhandlar verða knýttir at stórum handilsketum og sjálvstøðugu keypmenninir fækkast í tali.

### 3.3.6 Útlond

Sambært nýggjastu uppgerðum av inn- og útflutningi av vørum var avlop á handilsjavnanum á umleið 250 mió. kr. í 2010 sammett við hall á umleið 100 mió. kr. í 2009. Munurin stavar frá meiri útflutningi av uppsjóvarfiski eins og meira av botn- og alifiski varð útfluttur. Innflutningurin vaks eisini í 2010 sammett við 2009, sum stavaði mest frá hægri oljuprísum. Árini frammanundan hetta, tá ið húsarhaldsnýtslan vaks í stórum árini 2005 til 2007, vóru stór hall á handilsjavnanum, sí mynd 3.12.

Handilsjavnin, inn- og útflutningur av vørum, jan-05 til jun-11 — MYND 3.12




**Viðm.:** Innflutningur og útflutningur byggja á 12 mánaðar sum.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Umframt handilsjavnan fevnir gjaldsjavnin um handil av tænastum og um flytingar í útlond og úr útlondum. Mynd 3.13 vísir gjaldsjavnan síðstu árini. Handilsjavnin bendir á, at avlop verður á gjaldsjavnanum í 2010 og mest sannlíkt í 2011 eisini.

Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans, 1998-2009 — MYND 3.13




**Kelda:** Hagstova Føroya.

# ORÐALISTI

Orðalistin er ein lýsing av nøkrum av búskaparligu hugtøkunum, sum eru nýtt í frágreiðingini.

Arbeiðsfjøld
Tey, sum hava arbeiði, og tey, sum eru arbeiðsleys samantald.

Arbeiðsleys
Tey, sum eru arbeiðsleys, men sum eru tøk á arbeiðsmarknaðinum og leita eftir arbeiði og sostatt eru partur av arbeiðsfjøldini.

Arbeiðsloysi
Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøldini.

Avreiðingar
feskfiskiveiðan (av botnfiski og øðrum fiski) skrásett um avreiðingarskipanina. Mátað í virði ella í nøgd.

Bruttotjóðarúrtøka
Er eitt mát fyri alla inntøkuna, ið er skapað í einum landi ella búskapi ávíst tíðarskeið. Verður ofta mett at vera høvuðsmátið fyri búskaparligt virksemi. BTÚ er ikki fullkomið mát fyri inntøku ella framleiðslu í einum landi. T.d. leggur tað ikki upp fyri sliti av tilfeingi (náttúru- ella øðrum tilfeingi) ella útbúnaði. Eisini roynir BTÚ at máta allar vørur og tænastur til ein *marknaðarprís*, hóast allar vørur og tænastur ikki hava ein marknaðarprís, t.d. skúla- og heilsutænastur.

Catch control rule (harvest control rule, veiðisetningur) Reglugerð fyri, hvussu nógv loyvt ella ráðiligt er at fiska úr fiskastovnum í mun til stovnsstøddina, gýtingarstovn, tilgongd til stovnin o.tíl. eina ávísa tíð.

Eftirspurningur
Nøgdin av vørum og tænastum húsarhald, vinnan, tað almenna og umheimurin vilja keypa.

Fiskiloyvi
Eitt fiskiloyvi er tann rættur, sum landsstýrismaðurin letur eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðiloyvi, at veiða ávíst fiskidagatal og/ella ávísa nøgd úr ávísum fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.

Fíggjarpolitikkur
Búskaparpolitisk tiltøk, ið hava sum endamál at stýra og minka búskaparlig sveiggj. Skilt verður vanliga millum at reka *virknan fíggjarpolitik* og at brúka *automatiskar stabilisatorar.*

Framleiðsla
Nýtsla av tilfeingi og útbúnaði at framleiða vørur og tænastur sum hava virði. Virðið á framleiðslu verður mátað í føstum prísum, t.e. eftir vanligan prísvøkstur.

Framleiðni (produktivitetur)
Virðisøking fyri hvørja eind av tilfeingi nýtt í framleiðsluni (t.d. fyri hvørja eind av arbeiðsmegi).Framleiðni verður roknað realt, t.e. í føstum prísum ella frároknað vanligan prísvøkstur.

Gjaldsjavni
Hagfrøðilig uppgerð ið tekur samanum allar búskaparligar flytingar hjá einum landi við umheimin eitt ávíst tíðarskeið og mátað í sama gjaldoyra. Mest nýtta konta í gjaldsjavnanum er *rakstrarviðskifti gjaldsjavnans* (á enskum *current account*), ið fevnir um vøruflytingar og tænastuflytingar umframt lønar- og inntøkuflytingar millum íbúgvarnar í einum landi og umheimin.

Gýtingarstovnur
Samlaða tonsatalið á øllum fiskum, sum eru kynsbúnir. Fyri tosk á Landgrunninum er tað, tá toskurin er 3-4 ára gamal og eldri.

Handilsjavni
Virðið á uttanlandshandli (t.e. inn- og útflutningi) av vørum hjá einum landi við umheimin. Mátað í sama gjaldoyra og eitt ávíst tíðarskeið. Javnin verður ofta uppgjørdur sum útflutningur minus innflutningur (t.e. nettoútflutningur).

IMF
Altjóða Gjaldoyragrunnurin (International Monetary Fund, Washington). Stovnaður 27. desember 1945 við Bretton Woods-avtaluni.

Konjunkturar
Stutttíðarsveiggj í búskaparligari framleiðslu og í arbeiðsloysi samsvarandi høvuðsgongdini yvir longri tíð.

Kredittvirði
Evnini hjá einum lántakara at rinda einum lánveitara lán aftur eftir lánitreytunum. Verður oftast mátað sum sannlíkindini, at ein lántakari fer at rinda lánið aftur eftir lánitreytunum. Kredittvirðið er avgerandi fyri, hvørja rentu og hvørjar treytir ein lántakari kann læna pening fyri.

Nettotilflyting
Tilfutt fólk frádrigið fráflutt fólk. Talan er um nettotilflyting, eru tilflutt fólk fleiri enn fráflutt.

Recovery plan
Ætlan sum orðar eina mannagongd og tilskilar kravd stig fyri at verja stovnar, um fiskastovnar gerast somikið smáir og illa fyri, at vandi er fyri, at teir ikki megna at endurnýggja seg.

Rentumunur
Munurin millum inn- og útlánsrenturnar hjá peninga- og fíggjarstovnum í miðal. Rentumunurin er týdningarmesta inntøkukeldan hjá peninga- og fíggjarstovnum. Eisini kallað rentumarginalur.

Skattur og avgjøld
Kravd gjøld til tað almenna uttan nakra ávísa ella serliga mótveiting frá tí almenna.

Skuld
Upphædd sum búskaparlig eind (t.d. fyritøka, persónur ella land) skyldar aðrari búskaparligari eind.

Sosialir grunnar
Arbeiðsloysisskipanin (eisini kallað ALS), Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnurin (eisini kallaðar, AMEG, SAMEG ella AMG), Barsilsskipanin og sjúkrakassarnir.

Stovnsstødd
Samlaða tonsatalið á øllum fiskum í einum ávísum stovni, sum svimja í havinum til eina ávísa tíð, t.d. á toskinum á Landgrunninum í 2009. Í praksis vil tað siga fiskur, sum er 2 ár og eldri.

Tað almenna
Landið (landskassin), kommunurnar, sosialir grunnar, ríkisfyrisitingin, almenn og kommunal partafeløg.

Tilgongd
Tal á smáfiski, sum júst er vorðin 2 ára gamal, og harvið er vorðin ein partur av toskastovninum.

Uppsparing
Munurin millum inntøku og nýtslu hjá ávísari búskaparligari eind (t.d. einum húsarhaldi ella eini fyritøku).

Útboð
Vørunøgdin til samans og tænastur, ið eru tøk hjá húsarhaldum, vinnuni, tí almenna og umheiminum at keypa.

Veiðiloyvi
Veiðiloyvi er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar.

Veiðitrýst
Nøgdin sum verður fiskað burtur úr stovnunum. Støddin F, fiskideyðin, verður ofta nýtt at lýsa veiðitrýstið. Veiðitrýstið er tað einasta, ið vit sjálvi kunnu ávirka í fiskiskapinum yvir tíð.

Virðisøking
Munurin á virðinum á framleiðsluni og virðinum á nýtslu í framleiðsluni. T.e. tað virðið, ið verður lagt aftrat virðinum á nýtsluni (t.d. rávøru) við góðsking í framleiðsluni.

Vøru- og tænastujavni
Fevnir umframt um handilsjavnan um uttanlandshandil av tænastum hjá einum landi við umheimin, t.d. skipaflutningur, flogferðsla og aðrar tænastur. Mátað í sama gjaldoyra og eitt ávíst tíðarskeið.

# BÓKMENTIR

[1] Elena Anferova, Markus Vetemaa og Rögnvaldur Hannesson. Fish Quota Auctions in the Russian Far East: A Failed Experiment. Marine Policy, Vol. 29, 2005, bls. 47-56. Frágreiðing tøk á http://www.sciencedirect.com/science/article/B6VCD-4CBVMS3-2/2/29b6e1f602311c5e788ca342ecb599f3, 2004.

[2] Búskaparráðið. Búskaparfrágreiðing várið 2011. Frágreiðing tøk á www.buskap.fo, oktober 2010.

[3] Búskaparráðið. Búskaparráðið Várið 2000. Frágreiðing tøk á www.buskap.fo, januar 2000.

[4] Margit Eero, Markus Vetemaa og Rögnvaldur Hannesson. The Quota Auctions in Estonia and their Effect on the Trawler Fleet. Marine Resource Economics, Volume 20, bls. 101-112. Marine Resources Foundation. Grein tøk á http://purl.umn.edu/28290, 2005.

[5] Fiskidaganevndin. Tilmæli frá Fiskidaganevndini til landsstýrismannin í fiskivinnumálum fyri fiskiárið 2011/2012. Tilmæli um áseting av fiskidagatali tøkt á http://www.fisk.fo/Default.aspx?ID=2396&M=News&PID=6411&NewsID=3729, juni 2011.

[6] Føroya Reiðarafelag. Fiskivinnan á heimaleiðunum. Framløga tøk á http://www.shipowner-fo.com/101020_fiskivinnan_a_heimaleidunum.pdf, 2010.

[7] Rögnvaldur Hannesson. A Note on ITQs and Optimal Investment. Journal of Environmental Economics and Management, Volume 40, Issue 2, september 2000, bls. 181-188. Grein tøk á http://ideas.repec.org/a/eee/jeeman/v40y2000i2p181-188.html, 2000.

[8] Rögnvaldur Hannesson. Rights based fishing on the high seas: Is it possible? Marine Policy 35, bls. 667-674. Tøkt á http://ideas.repec.org/a/eee/marpol/v35y2011i5p667-674.html. Elsevier Ltd., 2011.

[9] Rögnvaldur Hannesson. The Privatization of the Oceans. MIT Press, Boston, Massachusetts, 2004.

[10] Hjalmar Hansen og Hjalti í Jákupsstovu. Loyvisskipan í føroysku fiskivinnuni eftir 2018. Frágreiðing latin Jacob Vestergaard, landsstýrismanni í fiskivinnumálum. Frágreiðing tøk á http://www.fisk.fo/Default.aspx?ID=2402&M=News&PID=7032&NewsID=3187, juli 2010.

[11] Havstovan. Tilmælið fyri fiskiárið 2011/2012. Tilmæli um áseting av fiskidagatali tøkt á http://www.hav.fo/get.asp?gid=dCE5F10AE-FD79-4391-AAE4-125D8F0240F0, 2011.

[12] ICES. Report of the North-Western Working Group. ICES CM 2011/ACOM:07., www.ices.dk/iceswork/workinggroups.asp og vel ‘North-Western Working Group’. Keypmannahavn, 2011.

[13] IMF. World Economic Outlook Uppdate. Frágreiðing tøk á http://www.imf.org/external/pubs/ft/weo/2011/update/02/pdf/0611.pdf, juni 2011.

[14] S. H. í Jákupsstovu, L. R. Cruz, J-J. Maguire og J. Reinert. Effort regulation of the demersal fisheries at the Faroe Islands: a 10-year appraisal. ICES Journal of Marine Science 64 (4): 730-737. Tøkt á http://icesjms.oxfordjournals.org/content/64/4/730.full, 2007.

[15] Nordisk Ministerråd. Økonomien i de nordiske fiskerier - Fokus på resourcerenten. TemaNord 2006:540. Tøkt á http://www.norden.org/da/publikationer/publikationer/2006-540. Keypmannahavn, 2006.

[16] Nordisk Ministerråd. Samfundsøkonomisk afkast af pelagiske fiskerier i nordøstatlanten. TemaNord 2010:573. Frágreiðing tøk á http://www.norden.org/da/publikationer/publikationer/2010-573. Keypmannahavn, 2010.

[17] OECD. Fisheries Policy Reform: National Experiences. OECD Publishing. Frágreiðing tøk á http://dx.doi.org/10.1787/9789264096813-en, 2011.

[18] OECD. Using Market Mechanisms to Manage Fisheries: Smoothong the path. OECD Publishing. Frágreiðing tøk á www.oecd.org/dataoecd/23/14/39318632.pdf, 2006.

[19] Jákup Reinert. Fundir í ráðgevandi nevndini (ACOM) hjá Altjóða Havrannsóknarstovninum (ICES) í mai/juni 2011. HAV smárit 11/03, tøkt á http://www.hav.fo/PDF/ACOM2011_HAV_smarit_11-03.pdf, 2011.

[20] Petur Steingrund. The near-collapse of the Faroe Plateau cod (Gadus morhua L.) stock in the 1990s: The effect of food availability on spatial distribution, recruitment, natural production and fishery. Doktararitgerð um føroyskan tosk, tøk á http://hdl.handle.net/1956/3697, oktober 2009.

[21] Torbjørn Trondsen. Fish Quota Auction Opportunities for Chile 2010. Expert opinion on open bidding as an allocation method for fishing quotas in an IQ system. Tøkt á http://triton.nfh.uit.no:86/Forskning/Kvoteforvatning/Torbjorn_Trondsen_Fish%20Quota%20Auction%20report_%20end.pdf, november 2010.

[22] United Nations Human Rights Committee. Views: Communication No. 1306/2004, International covenant on civil and political rights, Document CCPR/C/D/1306/2004. Tøkt á http://www.ohchr.org/Documents/Publications/SelDec_9_en.pdf, bls. 192-205, 14. desember 2007.

[23] Markus Vetemaa, Margit Eero og Rögnvaldur Hannesson. The Estonian fisheries: from the Soviet system to ITQs and quota auctions. Marine Policy 26 (2002) 95-102. Tøkt á http://ideas.repec.org/a/eee/marpol/v26y2002i2p95-102.html, 2002.

[24] The World Bank and Food and Agriculture Organization. The Sunken Billions. The Economic Justification for Fisheries Reform. Frágreiðing tøk á http://web.worldbank.org/WBSITE/EXTERNAL/TOPICS/EXTARD/0,,contentMDK:21930578~pagePK:148956~piPK:216618~theSitePK:336682,00.html. Washington, 2008.